mid_og_magn_2_2009:mid_og_magn_blatt 6/7/09 16:35 Page 1

Nr. 2 • Juli 2009

# MIÐ & MAGN



Føroya Skipara- og Navigatørfelag & Maskinmeistarafelagið

**ÚTGEVARI**

Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**BLAÐNEVND**

Eyðstein Djurhuus (ábyrgd).
Regin Nónstein.
Páll Hansen.
Jóan Petur Patursson.

**MASKINMEISTARAFELAGIÐ**

Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG**

Jekaragøta 10
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon: 31 69 73
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**BLAÐHALD**

Tey, sum ynskja at halda MIÐ & MAGN kunnu boða frá hesum í teldupost til:
**bladhald@midogmagn.fo**
Haldaragjaldið er 200,- kr. um árið; t.v.s. 4 bløð.

**ENDURGEVING**

Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
**www.mf.fo**
**www.fsn.fo**

**UMSITING**

Sp/f MEDIA
info@midogmagn.fo

**PRENT**

Spf. Gramar | www.gramar.fo
Prinfovejle | www.prinfovejle.dk

UPPLAG: 1.800




# Onkur glotti er

Kreppupakkar og sokallaði neyðug tiltøk merkja orðaskifti nógv nú um dagarnar. Sjálvandi skal núverandi støða takast í fullum álvara. Vit vilja tó ávara ímóti, at víðfevnd inntriv verða gjørd uttan neyva umhugsan. Sum støðan er, so er alneyðugt, at tey hjól, sum framvegis mala, ikki støðga upp, og soleiðis gera støðuna enn verri.

Vit hava næstan slett ikki lagt til merkis tey stóru frambrot, sum eru hend í okkara vinnulívi seinastu tíðina. Mið og Magn hevur sett sær fyri at gera vart við tey framstig, sum vit øll somul eiga at fegnast um.

Nýggja Norðborg, sum er bygd fyri at kunna virðisøkja veiðuna enn meira, er eitt gott dømi uppá henda framburð. Tað kemur serliga, at hava týdning nú veiðumøguleikarnir eru nógv avmarkaðir. Reiðaríið hevur uppiborið stórt rós fyri framskygni og áræði.

Fyrsta av trimum nýggjum veitingarskipum hjá Supply Service, er farið í vinnu. Talan er um eina risastóra íløgu, og nógv góð vællønt arbeiðspláss vera við hesum skipum. Tað er at fegnast um, at hetta reiðaríið við sínum royndum innan fiskivinnu, nú roynir nýggjar møguleikar.

Ofta er sagt, at okkum tørvar onnur bein at standa á. Fiskivinnan einsamøll kann ikki tryggja neyðuga inntøkuvøksturin. Nýggjar vinnur og inntøkur koma ikki dettandi niður úr luftini. Tann framburður vit síggja kemst av, at vinnufyritøkur við royndum, kapitali og áræði menna seg og royna nýggjar leiðir.

Vit mugu øll stuðla undir og eggja teimum, sum standa fremst í menningini av okkara vinnulívi. Tørvurin á tillagingum og nýskapan, fara uttan iva at merkja samskifti millum fakfeløg og arbeiðsgevarar í framtíðini.

Vegna *Føroya Skipara- og Navigatørfelag* og *Maskinmeistarafelagið*

*Eyðstein Djurhuus* ábyrgdarblaðstjóri

# Innihald



*Norðborg: Burðardygt skip fyri 280 milliónir s. 4*


| | |
|---|---|
| Onkur glotti er | 2 |
| Norðborg: Burðardygt skip fyri 280 milliónir | 4 |
| Maskinmeistarin stýrir Norðborg í landi | 12 |
| Sølufelagið hjá Norðborg sparir dýr millumlið | 13 |
| Frá Bresti til nýggju Norðborg | 16 |
| Verja lív, virðir og umhvørvi | 18 |
| Maskinmeistarin í brennideplinum | 21 |
| 10 milliónir til nýtt fiskirannsóknarskip | 22 |
| Limirnir eru samlagstryggjaðir | 24 |
| Maskinistar og sparingar | 25 |
| Próvhandan á Vinnuháskúlanum | 26 |
| Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum | 28 |
| Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum | 30 |
| Eftirløn undir FAS | 32 |
| HITI: 200 hitapumpur í tvey ár | 34 |
| Hitapumpuloysnir frá Demich | 36 |
| Føroyapumpan væl umtókt | 37 |
| Hitapumpur frá Reno-Vent | 39 |




*Verja lív, virðir og umhvørvið, s. 18*



*HITI: 200 hitapumpur í tvey ár, s. 34*



*10 milliónir til nýtt fiskirannsóknarskip, s. 22*



*Próvhandan á Vinnuháskúlanum, s. 26*

# Norðborg: Burðardygt s






# skip fyri 280 milliónir

**Nýggja Norðborg fekk stórfingna móttøkuna, tá hon kom á Klaksvík 2. mai. Nógv fólk var komið saman í Djúphavnini at taka ímóti stásiliga skipinum. Røður vóru hildnar og Klaksvíkar Hornorkestur setti hátíðarligan dám á løtuna.**

MIÐ & Magn fekk høvi ynskja eigarunum tillukku við skipinum, og hóast teir høvdu nógv um at vera, greiddu teir fúsir frá hesum einastandandi skipi.

Tað eru skjótt 4 ár síðani, at teir umhugsaðu at umbyggja gomlu Norðborg. Men tá komu teir eftir, at tað fór at gerast ov kostnaðarmikið, og tí mettu teir, at best var at byggja nýtt skip.

Tá tann avgerðin var tikin fóru teir undir at leggja ein nýbygning til rættis. Teir greiddu m.a. Føroya Banka frá ætlanini og tá bankin beinanvegin vísti áhuga fóru teir víðari við projektinum. Umframt eginpening er Norðborg fíggjað av Føroya Banka, Realkredittinum og fyrrverandi Glitnir Banka í Noreg.

## Valdu at byggja í Chile

Tá teir høvdu kannað, hvar best var at byggja nýggja skipið, valdu teir at lata eina skipasmiðju í Chile byggja, og 27. mai 2006 varð sáttmáli gjørdur við Asmar skipasmiðjuna í Chile. Og teir lata væl at arbeiðinum hjá skipasmiðjuni; dygdin er betri enn hjá nøkrum øðrum, eisini um okkara leiðir.

Tað er partafelagið Hvalnes, ið eigur nýggju Norðborg. Kristian Martin Rasmussen og synir hansara: Eyðun, Jón og Bogi eiga allan partapeningin í P/F Hvalnes. Norðborg kostaði um 280 milliónir krónur at byggja. Teir rokna við at skipið fer at fiska fyri u.l. 150 mió. kr. um árið.

**Norðborg í tølum**
Longd 83,55 m
Breidd 18,40 m
Djúpd 9,85 m
Brt 5,240
Klassi: Norsk Veritas
Skipasmiðja: Asmar, Talcahuano, Chile. Nýbygningur nr. 105
Kjølur lagdur: 13. februar 2007
Sjósettur: 21. februar 2008






# Gott yvirlit og øll nútímans tøkni á brúnni

| NAVIGATIÓNSÚTGERÐ | FRAMLEITT | MERKI | GREINING |
|---|---|---|---|
| **Radar no. 1:** | JRC | JMA 5300 | S band 10 cm og |
| **Radar no. 2:** | JRC | JMA 5300 | V band 3 cm |
| **Gyro:** | Simrad | | + 2 eindir GPS kumpass-JRC |
| **Autopilot:** | Simrad | | 2 eindir |
| **Plottarar:** | Olex/Sodena | | 2 eindir |
| **Trolskipan:** | Marport | | Dual reciver system + sensorar |

| FISKILEITIÚTGERÐ | FREMLEITT | MERKI |
|---|---|---|
| **Sonar – LF** | Simrad | SP 93 |
| **Sonar – LF** | Simrad | SH |
| **Simrad – trawl** | Simrad | FS 70 |
| **Echo sounder** | Simrad | EK 60 |
| **Echo sounder** | Simrad | EK 60 |





mid_og_magn_2_2009:mid_og_magn_blatt 6/7/09 16:35 Page 7



















## Fyrireikingar

Men áðrenn farið var undir at byggja var nógv at taka støðu til. Teir ynsktu eitt arbeiðsdekk, har tað bar væl til at hava yvirlit yvir arbeiðsgongdina umborð. Teir vildu eisini hava eina last, har palletir kundu nýtast fyri at lætta um landingina.

Somuleiðis vildu teir hava eitt langt troldekk, so teir – í størst møguligan mun – kundu umvæla fiskireiðskapin umborð. Slíkar umvælingar krevja nógv pláss, og reiðskapurin gerst jú størri og størri.

Norðborg er seks metur breiðari enn gamla Norðborg, og tað er hetta sum gevur skipinum so nógv størri møguleikar.

Skipið er eisini útgjørt til at veiða í tropiskum økjum m.a. við aircondition.

## Trol, nót og kraftblokk

Nótaflotin er meira og meira farin at veiða við troli. Okkurt skip hevur bert trol. Men Norðborg er eisini útgjørd við kraftblokki. Hetta meta teir framvegis hava týdning, serliga tá talan er um lodnuveiðu í íslendskum og norskum sjógvi eins og fyri makrel.

At fiska við nót hevur eisini týdning fyri at fáa rognini úr lodnuni til høldar.

Vónin hevur framleitt nótina. Men her ger altjóðagerðin seg eisini galdandi. Netið er framleitt í India fyriskipað av Vónini.

Japanarar vilja helst hava makrelin veiddan við nót, tí hetta gevur eina betri góðsku og harvið eisini betri prís.

Tað er heldur ikki hissini nót. Hon er 453 favnar breið og 125 favnar djúp. Til sammetingar kann nevnast, at fyrstu nótirnar vóru um 120 favnar langar og 60 favnar djúpar.




TANGAR

**Lower freezing hold:**
**Upper freezing hold:**
**RSW tangar:**
**Heavy fuel oil:**
**Marine gas oil:**
**Feskt vatn:**
**Raw fish buffer tank for meal factory:**
**Meal buffer tank:**
**Meal holds total:**
**Fish oil tanks:**

mid_og_magn_2_2009:mid_og_magn_blatt 6/7/09 16:35 Page 9

## Trolveirar farnir í søguna

Annars verður veitt við troli. Her liggur eisini nýhugsan; teir fara – stórt sæð – ikki at brúka stálveirar. Stálveirarnir verða avloystir av einum slagi av togi, sum verður nevnt Dyneema. Tað er sterkari enn veirur, og so nógv lættari at arbeiða við. At spleysa hetta er ikki øðrvísi enn við vanligum togverki. Tað sparir eisini maskinorku og harvið oljunýtslu, og er eisini lættari at fáast við í sjónum.

Annars eru trolini 1856 m. long. Línurnar nakað tað sama. Samlaða strekkið er um 4 km!

## Heimferðin gekk væl

Skipið bar seg sum ein dreymur á leiðini heim frá Chile. Tað var ringt veður á pørtum av leiðini, men hetta merktist nærum ikki.

Tað er óneyðugt at siga, at tey nautisku tólini eru tey fremstu, sum finnast á økinum, og tað sama er í maskinrúminum.

Teir á reiðarínum meta eisini eina stóra ogn vera í manningini, og teir fara eisini at hava nakrar fleiri mans við enn teir 24, sum manningin í minsta lagi skal vera.

”Vit hava roynd fólk, tí kunnu vit eins væl nýta tey,” sigur Jón Rasmusen. Inntøkumøguleikarnir skuldu verið góðir við kvotum frá bæði Christian í Grótinum og gomlu Norðborg. Tí ber eisini til at hava eina skiftisskipan, so báðar manningarnar kunnu vera við. Tað eru bert fáir mans av teimum gomlu skipunum, sum ikki komu við Norðborg.



*Eyðstein Djurhuus og Christian Martin Rasmusen*

## Góðar umstøður hjá manningi

Tað er pláss fyri 32 monnum í 20 kømrum umborð á Norðborg. Tað eru 10 tveymanskømur, restin er einmannskømur.

Inni á hvørjum kamari er baðiverilsi. Her er eisini sjónvarp við DVD spælara. Eisini er telefon, so altíð fæst samband heim fyri ein rímiligan pening. Her er eisini møguleiki fyri at nýta teldu og at samskifta á tann hátt.

Umframt eina góða messu eru eisini uppihaldsrúm hjá manningini við sjónvarpi, har allar kanalir kunnu síggjast. Her er fittnesrúm við allari útgerð til venjing. Eisini er sauna. Harumframt er eitt serútgjørt sjúkrakamar.

Fyrr skuldu menn hava rein klæði við sær til allan túrin. Men tað er eisini søga. Slík skip sum Norðborg hava vaskimaskinur og turkitrumlur.

## Framkomin verksmiðja

Tað er Rolls Royce samtakið í Noregi, sum hevur skipað fyri innrættingini av skipinum. Hetta hevur verið vorðið sum uppgáva, tí umframt at vera eitt framkomið fiskiskip, er nýggja Norðborg eisini fremsta fiskavirki í landinum.

Norðborg kann framleiða 200 tons av lidnari vøru um dagin, tá framleitt verður við fullari megi, og tí ber til á pappírinum at fylla lastina, 1.400 tons, eftir eina viku. Men roknað verður tó við at nýta 14-16 dagar um túrin. Tá teir virka sildafløk er úrtøkan um 50%. Hetta merkir, at um 400 tons av heilari sild kunnu fara gjøgnum maskinurnar um samdøgrið.

| | |
|---|---|
| | Uml. 1090 $m^3$ |
| | Uml. 1390 $m^3$ |
| | Uml. 1230 $m^3$ |
| | Uml. 660 $m^3$ |
| | Uml. 250 $m^3$ |
| | Uml. 280 $m^3$ |
| ry: | Uml. 90 $m^3$ |
| | Uml. 100 $m^3$ |
| | Uml. 1000 $m^3$ |
| | Uml. 175 $m^3$ |



mid_og_magn_2_2009:mid_og_magn_blatt 6/7/09 16:36 Page 10




Tað eru sjey flakamaskinur, hvør av teimum kann virka tríggjar fiskar um sekundið. Ein maður er nóg mikið at ansa øllum hesum maskinum í senn. Lagt verður automatiskt í, og liggur ein fiskur skeivur, verður hann automatiskt sendur aftur, eins og skaddir fiskar sjálvir fara í slógvið.

Møguleiki er fyri fleiri framleiðslum í senn. Verður sild og makrelur veidd saman, ber til samstundis at flakaskera sildina og at frysta makrelin heilan.

Tað ber til at framleiða fløk bæði við og uttan skræðu. Tað ber eisini til at skilja fløkini eftir støðd alt eftir tørvinum hjá marknaðinum.

## Nógv er sjálvvirkandi

Framleiðslan verður eisini pakkað automatiskt. Í lastini verður framleiðslan sett á pallir, sum kunnu setast í lastina í tveimum hæddum. Frystilastin kann halda kuldan á -30 stigum, sjálvt tá ið sjógvurin er 20 hitastig.

Framleiðslan er grundleggjandi sum á gomlu Norðborg, men hædd er tikin fyri tí sum kundi vera betri. Millum annað varð fiskurin fluttur við transportbandi við gomlu Norðberg. Á teirri nýggju verður fiskurin pumpaður. Hetta merkir minni av skaddum fiski.

Hóast tað sær trongt út á arbeiðsdekkinum, so er tó hædd tikin fyri, at tvær flakamaskinur kunnu koma afturat.

## Eisini fiskamjøl

Slógvið verður samstundis framleitt til mjøl. Henda framleiðsla kemur serliga væl við, tá ið teir eru á lodnuveiðu. Tá kunnu teir sortera fiskin, so kvennfiskurin fer til frystingar til nógv hægri prís, meðan kallfiskurin fer til fiskamjøl. Tá verður ikki so neyðugt at hugsa so nógv um at fara inn at landa. Tí kunnu teir eisini liggja longri úti. Hetta er størsti vinningurin við at kunna framleiða mjøl umborð.

Fiskamjølsvirkið umborð kann framleiða 300 tons av rávøru um samdøgrið, og avlopshitin frá maskinarínum verður so nýttur til fiskamjølsframleiðsluna.

Jón Rasmusen sigur, at "vit síggja fram til at framleiða okkara veiðu til eitt mundi hægri støði. Málið er góðska. Vit ynskja at okkara kundar skulu vita, at tá ið teir keypa fisk frá Norðborg fáa teir bestu góðsku."

## Makrelurin undirmettur

Norðborg fer at fiska sild, makrel, svartkjaft og lodnu, men eru nú byrjaðir at fiska sild.

Jón sigur, at tað vísir seg, sum at makrelstovnurin er øktur nógv á norðaru og vestaru leiðunum, sum tað eisini sæst í øktu íslendsku veiðuni seinastu árini.

Vit kundu nú havt fiskað túsundir av tonsum av makreli norðanfyri Føroyar. Fyri átta ella níggju árum síðani fanst makrelur ikki á hesum leiðum. Viðhvørt ber ikki til at fiska fyri makreli. Tað sær út sum at stovnurin er undirmettur.

## Trúføst manning

Kann siga av royndum, at reiðaríið er gott, og tí trívist fólkið væl við. Tað eru framvegis fleiri mans eftir frá teirri fyrstu Norðborg, sum kom í flotan fyri eini 40 árum síðani. Hesir eru Jefri Justinussen, ættaður í Leirvík, búsitandi í Havn, Rólvur Sivertsen úr Hvannasund og John Bjarnason úr Skálavík.

Hesir kunnu sigast at hava sæð eina ótrúliga menning í umstøðunum hjá fiskimonnum, síðan teir sum ungir vóru við slupp.

Tá búðu teir í einum lugari við 10 monnum. Her var eisini matgjørt og hetta var eisini uppihaldsrúm. Einasta "sanitet" var ein pøs!

Tá ið Jefri ungur fór til skips høvdu teir ikki so frægt sum eitt ekkolodd. Nú er brúgvin sum á einum rúmdarfari.

## Queen of the sea

Nýggja Norðborg er so slóðbrótandi, at virda fiskivinnutíðarritið Fishing News International sendi blaðmannin Quentin Bates til Føroyar bert at skriva um Norðborg, sum hann kallar "Queen of the Sea", havsins drotning.

Hetta hevur eisini verið høvuðssøgan í juni blaðnum hjá teimum.

Quentin Bates hevur ofta verið í Føroyum. Vit høvdu nógv samskifti ta tíð tað var. Tað hava vit framvegis, og hann hevur givið mær loyvi til at taka burturúr hansara greinum um Norðborg.

Quentin dylur ikki fyri, at hann er hugtikin av skipinum, sum hann metir vera heimsins mest framkomna fiskiskip. Men hann er eisini hugtikin av monnunum aftanfyri, Kristian Martin og hansara synum.



*Í miðjuni, Regin Olsen, næstformaður í Maskinmeistarafelagnum, saman við maskinstjórunum á Norðborg.*

# Norðborg: Mororar og skrúvur

| MOTORAR | FRAMLEITT | MERKI | KRAFT | RPM | GREINING |
|---|---|---|---|---|---|
| **Høvuðsmotorur:** | RRM, Bergen Diesel | B32:40v12P | 6000kW | 750 | HFO grade IF 180 |
| **Main reduction gear:** | RRM, Kamewa Ulstein, | AGHC 3000 KS 560 | 6500kW, | | PTO:3000kW PTI:500 kW |
| **Power take of/in:** | PTO: 3.000 kW, PTI: 500kW | | | | |
| **Auxiloary engine no. 1:** | RRM, Bergen Diesel, | C25:33 19a, | 2610kW, | 900 | HFO grade IF 180 |
| **Generator no. 1:** | Avk, | DSG 114 M1-8w, | 3132kVA, | 900, | 440 V, 60Hz |
| **Emergensy/h. engine:** | Mitsubishi, | S6R – MPTK, | 635kW, | 1800 | Marine Diesel Oil |
| **Emergensy/h. generator:** | Stamford, | HC.M634 G2, | 754kVA, | 1800 | 440 V, 60 Hz |
| **Shaft generator:** | Avk, | DSU 114 M1-6w, | 3750kVA, | 900 | 440 V, 60Hz |

| SKRÚVUR | FRAMLEITT | MERKI | KRAFT | RPM | GREINING |
|---|---|---|---|---|---|
| **Propeller:** | RRM, Kamewa Ulstein, | XF5-102/4E, | 6500kW, | 143 | Main engine 6000kW |
| **Stern tubes:** | Simplex, | Compact, | Compact, | | Aft + Fwd |
| **Propeller nozzle:** | RRM, Kamewa Ulstein, | 19A – 4000 N, | 19A – 4000 N | | Diameter: 4000 mm |
| **Side thruster – aft:** | RRM, Kamewa Ulstein, | TT 1850, | Tt 1850, | 337 | CP propeller – dia. 1880 mm |
| **El. motor:** | ABB, | M2FA 400 LKB 4, | M2FA 400 LKB 4 | | |
| **Side thruster – fwd:** | RRM, Kamewa Ulstein, | TT 1850, | Tt 1850, | 337 | CP propeller – dia. 1880 mm |
| **El. motor:** | AvK, | M2FA400 LKB 4, | M2FA 400 LKB 4 | | |



Hann er ovfarin av móttøkuni, sum skipið fekk. Men eisini, at eigararnir høvdu tíð at taka sær av øllum teimum vitjandi, uttan mun til um hetta vóru veitarar til skipið ella ein skúlaflokkur við lærarum, sum komu umborð.



Virðingin er ikki minni av royndini at hjálpa til at bjarga Klaksvíkini við at keypa nakrar av teimum partrolarum, sum hoyrdu til Kósina.

## Ynskja góða eydnu

Mið og Magn og feløgini aftanfyri blaðið ynskja reiðarínum hjartaliga tillukku við skipinum. Vit fegnast um, at vit hava menn, sum veruliga kunnu bróta upp úr nýggjum, sum tað er hent her. Tað er eisini við spenningi, at vit fara at fylgja gongdini.

Skrivað: Óli Jacobsen

# Maskinmeistarin stýrir Norðborg í landi

**Umborð á nýggju Norðborg er tað skiparin, sum hevur síðsta orðið at skula sagt, men í landi er tað maskinmeistarin. Men væl at merkja ikki ein av teimum mongu maskinmeistarunum, sum eru við skipinum. Í landi er tað stjórin Eyðun Rasmussen, sum stýrir skrivstovuni, og hann er maskinmeistari, og hevur verið nógv til skips. Men í 2003 fór upp á land, og tað dámar honum væl.**

Sjálvt um hann byrjaði sítt lestrarlív á landi, so hekk tað líkasum altíð í luftini, at Eyðun Rasmussen skuldi fara til skips fyrr ella seinni. Tað varð, kunnu vit siga, forvænta av einum av synunum hjá Kristian Martin Rasmussen.

## Í LÆRU

Fara vit heilt aftur til fyrsta veruliga starvið hjá Eyðuni Rasmussen, stjóra hjá P/F Palla hjá Mariannu, sum er móðurfelagið kring virksemið hjá Kristian Martin Rasmussen og teimum, so var tað ein túr til skips. Árini 1984 til 1987 var hann við Christian í Grótinum, men so fór hann í læru til maskinsmið. Omaná fekk hann sær tó beinanvegin maskinmeistara, so tá hann fór umborð aftur á Christian í Grótinum í 1991, var adressan maskinan.

## 8000 HESTAR

Tá mann er maskinmeistari og hevur leiðsluna í landi, er tað ikki altíð, at mann sleppur at fáast við tílíkt, sum hevur við maskinur at gera. Umsitingarliga arbeiðið á skrivstovuni, liggur í flestu førum langt burturi frá teimum 8000 hestunum, sum høvuðsmotorurin á nýggju Norðborg kann framleiða. Men tað ber til at fylgja við, og tá prátið fellur á tann tekniska partin av nýggjasta skipinum, hoyrist at tað er ein fakmaður ið prátar.

– Afturat høvuðsmaskinuni hava vit sett ein ljósmotor í, sum framleiðir 3400 hestar, fortelur Eyðun.

– Orsøkin til, at ljósmotorurin noyðist at vera so stórur, er fyri at hava orku til at dríva stóru fabrikkini, umframt sjálvt skipið, leggur hann afturat.

## SEKS MASKINMENN VIÐ



*Seinastu seks árini hevur stjórin Eyðun Rasmussen, sum er maskinmeistari, arbeitt á skrivstovuni hjá P/F Hvalnes, ið m.a. eigur Norðborg. Honum dámar væl í landi, men leingist umborð aftur viðhvørt.* *Mynd: Leif Láadal*

Umborð á Norðborg verða seks maskinmenn við í senn. Hendan fyrsta túrin eru teir enn fleiri, tí allar vaktir skulu seta seg inn í skipanirnar, men tá alt tað er fingið upp á pláss, verða seks maskinmenn við fast.

– Umborð hava vit trý ábyrgdarøkir fyri maskinurnar, so tað verða tríggir maskinmeistarar við hvør sínum øki. Afturat teimum eru so tríggir maskinmenn við hvønn túrin, greiðir Eyðun frá.

Og tað er neyðugt við fakkunnleika, tí

maskinurnar gera ein stóran part av tí arbeiði, sum fólk fyrr gjørdu. Eitt nú skal mjølfabrikkin kunna arbeiða sjálv. Tá alt tað tekniska er komið at rigga sum tað skal, eigur slett ikki at vera neyðugt at hava fólk umborð, sum arbeiða fiskin til mjøl. Teir einastu, sum skulu gera nakað, eru maskinmenninir, ið bara skulu kanna, um alt gongur sum tað skal av sær sjálvum.

### TIL KILI

At arbeiða í landi er kortini ikki heilt ókent fyri Eyðun. Tá Christian í Grótinum varð bygdur í 1997/98 valdi hann at flyta til Kili fyri at hava eftirlit við byggjarínum. Har búði hann í fimm mánaðir.

– Tað var ein spennandi uppgáva, men eisini ein neyðug uppgáva, tí onkur frá okkum mátti tryggja, at skipið bleiv, so sum vit ætlaðu tað, sigur Eyðun, sum tó ikki fekk lært nakað serligt av sponskum í Suðuramerika.

– Tey flestu fólkini, sum eg samskifti við á skipasmiðjuni, dugdu væl enskt, so tað var málið, sum vit brúktu, greiðir hann frá.

Christian í Grótinum varð leveraður mánaðarskiftið januar/februar 1998, og tá fór Eyðun sjálvur í maskinuna. Har var hann í fimm ár, til hann í 2003 fór á skrivstovuna hjá reiðarínum at arbeiða.

– Tað er ikki tað sama at arbeiða í landi, men mær dámar tað væl. Onkuntíð sakni eg tó tað at sigla, serliga tí at ein sjómaður arbeiðir, tá hann er úti, og hevur frí ella heilt aðrar uppgávur, tá hann er heima. Tá man arbeiðir í landi, kann tað viðhvørt tykjast sum at man altíð arbeiðir, fortelur Eyðun Rasmussen.

Skrivað: Leif Láadal

# Sølufelagið hjá Norðborg sparir dýr millumlið

**Tað er eingin orsøk at brúka dýr millumlið, tá mann kann sleppa undan. Og soleiðis er eisini hjá nýggju Norðborg. Tá veiðan skal seljast, er tað eitt felag, sum P/F Hvalnes og Atlantic Pelagic eiga saman við Poul Huus, sum hevur ábyrgd av søludeildini. Meginparturin av veiðini fer til Eysturevropa og Fjareystur, men ein partur verður seldur í Føroyum.**

Í teimum flestu londunum eystanfyri og summastaðni í fjareystri er tað framvegis soleiðis, at vaksið fólk dáma sera væl sild og annan feitan fisk. Tá vit so skulu av við okkara vøru, er tað ofta lættast at fáa betri prís eystanfyri, tí har eru til reiðar at brúka lutfalsliga nógvan pening upp á at fáa góða góðsku, og hana kunnu vit levera.

Poul Huus tosar skjótt. Hann er á heimavølli. Tosar um marknaðin eystanfyri og longri úti í verð, sum hann kennir út og inn, og ikki bara tað: Hann tosar eisini um eitt evnið, sum hann hevur arbeitt við meginpartin av sínum vaksna lívi: Uppisjóvarfisk.

Vit eru stødd á skrivstovuni hjá P/F Palla hjá Mariannu, sum er móðurfelagið, ið eigur nýggju Norðborg og alt hitt virksemið rundanum. Í hølunum húsast, umframt leiðsla og starvsfólk, eisini ein væl skipað søludeild, sum er ein samanrenning av



*Poul Huus er sølustjóri fyri nýggju Norðborg. Tað arbeiði gongur fyri seg í einum felag, sum P/F Hvalnes, ið eigur Norðborg, eigur saman við norska felagnum Atlantic Pelagic og Poul Huus sjálvum.* *Mynd: Leif Láada*

felagnum hjá Norðborg, sølumanninum Poul Huus og norska felagnum Atlantic Pelagic.

## PULVURKAFFI

-Nógv fyri, at vit ikki eiga vanligt kaffi í húsinum, tá mann hugsar um, at Norðborg kostaði yvir eina kvarta milliard, sigur Poul Huus og flennur meðan hann rættir mær eitt krúss av Nescafé.

Men tað smakkar nú bara væl; er ordiliga heitt, og ikki lunkað, so sum tað vildi verið, um tað var "veruligt" kaffi, sum hevði staðið í einari termokannu nakrar tímar.

Poul gevur sær góða tíð at práta. Hann er blíður og tíður, men tú kennir eitt sindur á honum, at hann gjarna vil hava samrøðuna av vegnum, so hann kann sleppa aftur til arbeiðis. Og tað er einki at siga til. Nýggja Norðborg hevur verið úti í eina viku á sínum fyrsta túri, og tað er umráðandi at fylgja við í, hvussu tað gongst at fiska. Tað er umráðandi at fáa at vita slag, stødd og góðsku, so Poul longu nú kann byrja at gera avtalur við møguligar keyparar.

## FÝRA SLØG

Norðborg skal fiska fýra sløg av pelagiskum fisk. Og árið er rættiliga fastlagt, tá tað snýr seg um nær fiskað verður tey ymsu sløgini. Í desember og januar fiska teir svartkjaft, í februar lodnu, og so aftur svartkjaft í mars og apríl. Sildafiskiskapurin byrjar í mai og heldur fram til november, um tað nóg nógv til.

Makrelurin er samstundis sum sildin, í oktober og november.

Tað hevur higartil verið soleiðis, at øll framleiðslan fór til eysturevropa og fjareystur, men í seinastuni hevur ein nýggjur marknaður tikið seg upp í Føroyum. Høvdavirkið í Leirvík (Faroe Marine Products) hevur nevniliga umbiðið svartkjaft til turkingar, og hann verður latin avhøvdaður.

Ja, tað kann kanska virka eitt sindur løgið, at vit selja Høvdavirkinum avhøvdaðan fisk, skemtar Poul Huus.

## HUGSA UM UMHVØRVIÐ

Nýggja Norðborg tekur alt, og tað kann gott sigast einaferð afturat: ALT við til lands. Skipið er teknað, projekterað og tonkt sum eitt burðardygt skip allan vegin ígjøgnum.

At hugsa um umhvørvi er ikki ein møguleiki, men eitt krav í dag, fortelur Poul Huus.

Tað hevði ivaleyst borið til at bygt eitt sindur bíligari, og so satsað upp at forvunnið pengar kortini, men ta loysnini vildu eigararnir ikki hoyra talan um.

Tað passaði væl til hugburðin í felagnum, at skipið bleiv bygt eftir teimum umhvørviskrøvum, sum marknaðurin setur í løtuni, og sum marknaðurin kann hugsast at fara at seta, greiðir Poul frá.

Nøkur av teimum krøvum, sum verða sett, eru skipað eftir MSC-leisti (Marine Stewartship Counsel). Í dag er tað soleiðis, at fleiri handilsketur als ikki keypa fisk, sum ikki hevur MSC merki. Viðvíkjandi sildini og makrelinum hjá Norðborg, so hevur skipið MCS-góðkenning, og lodnan er á veg. Eitt sindur er eftir á mál við svartkjaftinum, tí MSC-góðkenning verður ikki latin vørum, sum ikki fylgja tilráðingum frá ICES, og sum kunnugt, verður sambært ICES fiskað ov nógvur svartkjaftur.

## FRAMLEIÐA ALT UMBORÐ

Nýggja Norðborg er einasta fiskiskip í Norðuratlantshavi, sum klárar at framleiða alt umborð, sum kemur á dekkið. Verksmiðjan er risastór og koyrir í tveimum deildum, so at siga. Fiskavirkið kann hagreiða fiskin eftir tørvi, tað verið seg avhøvda, kryvja og skera flak og enntá portiónir, meðan hin parturin av verksmiðjuni ger mjøl ella lýsi.

Tað er ikki loyvt at blaka nakað út, men hjá okkum er heldur eingin tørvur á tí, tí alt verður brúkt, og alt hevur eitt virði, sigur Poul Huus.

Tá so vøran er framleidd, fær hon eitt nummar, sum verður lagt inn í eina sporførisskipan, sum P/f Hvalnes hevur ment saman við Formula.fo og Marell í Íslandi. Á tann hátt kann keyparin altíð síggja, hvaðani fiskurin stavar, og hvar hann varð viðgjørdur.

Skuldi tað hent, at ein kundi fær eina vánaliga vøru, so kenna vit fullkomnu lívsleiðina hjá vøruni í allari skipanini, sigur Poul Huus.

Telefonin hjá sølustjóranum ringir aftur. Hon hevur ringt nakrar ferðir meðan vit hava prátað, men Poul hevur bara hugt at nummarinum og so brotið av, men hesaferð er øðrvísi.

Tað er Norðborg. Eg má taka hana, sigur hann og yppir øksl.

Tað er í fínasta lagi. Vit eru lidnir, svari eg, og takki fyri kaffimunnin.

Skrivað: Leif Láadal



*Nýggja Norðborg er einasta fiskiskip í Norðuratlantshavi, sum klárar at framleiða alt umborð, sum kemur á dekkið. Verksmiðjan er risastór og koyrir í tveimum deildum, so at siga.*



»Eg havi innlit í míni útlit«

Mær nýtist ikki at stúra. Hvørki fyri mær sjálvari, makanum ella børnunum.

Snýr tað seg um lívstrygging, óarbeiðsføristrygging ella eftirløn, fært tú altíð bestu ráðgevingina frá Lív. Vit taka støði í tínum tørvi.

Við Lív fært tú innlit í tíni útlit.

Innlit í útlit

www.liv.fo

# Frá Bresti til nýggju No

**Brestir fær kraftblokk ísettan í Íslandi í 1962, og teir fara á saltsildaveiðu. Hetta kravdi stóra manning, einar 25 mans, og tað vóru rættulig tørn hjá hesum monnum at reinsa undan, tá teir fingu tey stóru køstini.**

Óli Jacobsen greiður her frá gongdini frá tí, at føroyingar gjørdu fyrstu royndirnar við kraftblokki til dagin í dag.

Um okkara leiðir vóru íslendingar fyrstir við kraftblokkinum. Og tá tað gekk væl hjá íslendingum loypti tað brell á føroyingar.

Brestir fær kraftblokk ísettan í Íslandi í 1962, og teir fara á saltsildaveiðu. Hetta kravdi stóra manning, einar 25 mans, og tað vóru rættulig tørn hjá hesum monnum at reinsa undan, tá teir fingu tey stóru køstini.

So við og við fingu fleiri skip kraftblokk. Í fyrsta umfari vóru tað línuskip, sum vórðu umbygd. Fyrstu árini veiddu skipini bert við kraftblokki á sumri, meðan skipini vóru á vanligari línuveiðu um veturin.

## Blokkurin skapar heilársveiðu

Men tað var skjótt, at alt broyttist. Tá ið Eiler Jacobsen við Boðanes fór at veiða í Norðsjónum og landa í Hirtshals, gjørdist kraftblokkurin skjótt heilársveiða. Tað var eisini skjótt, at tað var givist við at salta sildina umborð í tunnur. Hetta gjørdist og strævið.

Skipini fóru partvíst at fiska sild til fiskamjølsframleiðslu. Annars var farið at ísa sildina í kassar. Hetta gav munandi hægri prís, men var eisini arbeiðskrevjandi. Men á hesum økinum hendi eisini skjótt ein kollvelting, og tað vóru tangar, sum eisini Eiler Jacobsen stóð fyri í Føroyum. Nú varð sildin koyrd beinleiðis í kølitangar, og skuldi ikki koyrast í kassar fyrr enn á kajuni í Hirtshals. Hetta var eitt framúr framstig og so øgiliga nógv lættari. Hetta gjørdi eisini, at fiskast kundi munandi meira, tá tað ikki var neyðugt at bíða til sildin fekst undan.

## Óneyðugt at koyra í kassar

Men tað endaði ikki við tí. Skjótt var komið fram til, at tað var óneyðugt at koyra sildina í kassar á landi. Næsta framstig varð, at sildin heldur enn at verða hóva í land varð pumpað beinleiðis inn á virkið.

Tíðin fór – sum frá leið – frá teimum gomlu umbygdu línubátunum. Nú fóru reiðarar at byggja størri skip til kraftblokkaveiðu. Nakað samstundis tekur svartkjafturin seg upp. Tá varð gjørdur ein serligur sáttmáli, sum stuðlaði hesi veiðu. Skipini fingu sær trolútgerð og veiddu so svartkjaft ta tíðina, tá ið mest var til av honum. Tá kravdust færri menn. Nakað seinni fingu skipini eisini nótaleggjarar og spardi hetta fleiri mans. Frá at vera 18-19 mans kom manningin niður á 12.

## Palli Rasmussen uppí leikin

Tað var vist í 1974, at Gøtu Samvinnufelag bílegði eitt nótaskip á Skála Skipasmiðju, eftir at tað hevði gingist væl við Jupiter, sum var bygdur har nøkur ár fyrr. Tá vóru útlitini so vánalig fyri nótaskipini við ásettu veiðuavmarkingunum, at felagið í Gøtu slepti sáttmálanum. Hann var síðani yvirtikin av Palla Rasmussen, pápa Kristian Martin í Klaksvík.

Palli var tá kendur sum ein legenda í føroyskum fiskiskapi gjøgnum ártíggir. Eingin kom honum nær, tá ið tað ráddi um at fiska. Hetta er í sær sjálvum eitt løgið fyribrigdi, at tað kann vera so ymiskt við fiskieydnu. Tað merkiliga er eisini, at



*Gamla Norðborg, ið varð bygd í Noregi í 1990. Upprunanavn: Gardar.*

# lorðborg

hetta er ein eginleiki, sum tykist at ganga í arv í fleiri ættarlið, sum tað eisini er galdandi her.

Palli var framum alt línumaður. Seinasta skip, hann førdi var línuskipið Borðoyarnes, sum Kjølbro upprunaliga læt byggja. Nøkur ár seinni keypti hann skipið og helt á við at føra tað.

At keypa hetta skipið var tá eitt djarvt stig. Men eftirtíðin hevur víst, at tað var rætt. Tað hevur tó gingið upp og niður hjá tí skipinum. Veiðumøguleikarnir fækkaðust eitt tíðarskeið, og teir royndu fleiri nýggjar leiðir á fjarleiðum, sum ikki gingu so væl. Teir fóru eisini á húsagang, men fingu skipið og áræðið aftur.

## Størri skip – nýggjur sáttmáli

Seinni fóru menn at útvega sær størri skip til nóta- og eisini trolveiðu. Fyrsta stig í so máta var Gullfinnur í 1980 hjá Regin á Rógvi. Gullfinnur var størri og nógv dýrari enn vanligu nótaskipini. Men hann gav nógv størri møguleikar, eisini tí teir lastaðu nógv meira.

Sáttmálin var tá 26,5% til manningina. Men teir, sum stóðu aftanfyri Gullfinn vístu á, at skuldi skipið hava nakran møguleika at bera seg, mátti nevndi prosentpartur minkast. Hinvegin vildu veiðu- og harvið inntøkumøguleikarnir hjá manningini gerast munandi størri enn prosentniðurskurðurin kostaði. Manningin kundi eisini vera minni. Harvið fór meira at koma burturúr til fiskimenn.

Hetta endaði so við sáttmála um 20% til manningina. Gullfinnur fiskaði væl. Manningin hevði góða inntøku, meira enn við vanligum nótaskipum. Men hóast niðurskurðin í prosentunum bar Gullfinnur seg ikki, og hann fór av landinum aftur.

## Tróndur í Gøtu

Tá er tað, at Tróndur í Gøtu verður bygdur, og hann kemur undir sama sáttmála. Tað var rættuliga skjótt, at teir mundu fingið somu lagnu sum Gullfinnur. Skipið bar seg ikki, og kundi lættliga, eins og Gullfinnur, farið av landinum.

Hetta endaði við, at sáttmálin fyrst fór niður í 16% og síðan upp aftur á 17,5%.

Sigast kann at henda tilgongd bjargaði Tróndi í Gøtu, og gjørdist hetta grundarlagið fyri tí nótaflota, sum í dag er í Føroyum og sum gevur landinum, manningum og reiðarum ævintýrligar inntøkur.

## Kristian Martin fekk mót

Hetta gav so eisini Kristian Martin Rasmussen, soni Palla, mót til at fara í holt við eitt líknandi skip sum Tróndur í Gøtu. Hann bíleggur ein nýggjan Christian í Grótinum fyri tann gamla og letur hann byggja í Chile. Alt var framvegis so óvist, at teir í Grótinum bóðu um at fáa somu sømdir sum Tróndur í Gøtu hevði havt, t.v.s. at sigla fimm ár fyri 16% fyri síðan at fara upp á 17,5%.

Hetta játtaðu mannningarfeløgini, tó við tí ískoyti, at henda skipan skuldi bert galda, til teir høvdu fiskað fyri 150 mill, sum eftir tátíðar meting vildi tikið 5 ár. Tað gekk kortini so mikið væl, at teir náddu hetta eftir bert trimum árum.

Tað kom at ganga strálandi. Henda góða gongdin hjá reiðarínum førdi so til, at teir keyptu nótaskipið Norðborg hjá p/f Hvalnes. Hetta gekk aftur so væl, at teir fingu sær aðru Norðborg. Hetta var nýhugsan, tí veiðan kundi virkast umborð. Hetta gav eisini fleiri arbeiðspláss til fiskimenn. Her var so aftur gjørdur ein nýggjur sáttmáli, sum tók atlit til, at her var brúk fyri enn størri manning.

Hetta er forsøgan til nýggju Norðborg. Hon lýsir, hvussu væl tað kann gangast, tá ið allir partar lata vit og skil ráða. Frá Brestir, sum kundi taka eini 150 tons av ídnaðarfiski, fingu vit skip, sum tóku 20 ferðir so nógv. Og frá at fiskurin nærum ikki varð viðgjørdur umborð, er nýggja Norðborg eisini eitt framkomið framleiðsluvirki.

Skrivað: Óli Jacobsen



*Christian í Grótinum, bygdur í Chile í 1998.*

mid_og_magn_2_2009:mid_og_magn_blatt 6/7/09 16:36 Page 18

# Verja lív, virðir og u

**Det Norske Veritas (DNV) er ein sjálvsognarstovnur, hvørs endamál er at verja lív, virðir og umhvørvið. DNV var stovnað í 1864, og tey fyrstu árini fekst stovnurin mest við at økja um trygdina á sjónum, har serliga trygdarkrøv til skipini blivu økt.**

Síðan tá er stovnurin mentur og er í dag ein globalur veitari av tænastum innan víttfevnandi økir. Okkara kjarnuførleikar eru at eyðmerkja, meta um og ráðgeva um vandaleiðslu og sjálvandi góðkenna eftir egnum reglum og altjóða standardum. Um vit so klassa eitt skip, sertifisera eina framleiðslu, leiðsluskipan í fyritøku ella tryggan skiparakstur, so er okkara fokus trygt og ábyrgdarfult at betra um virkisavrikið. DNV arbeiðir eisini sera nógv innan oljuvinnuna, og er offshore øki sera týðandi táttur í okkara virkisøki.

DNV hevur í dag 300 skrivstovur í 100 londum og umleið 9000 fólk í starvi. Sí annars meira kunning á www.dnv.com



District Manager Andrass Joensen Det Norske Veritas www.dnv.fo

## Tryggja eina burðardygga framtíð

Í dag er okkara høvuðsmál eisini at tryggja eina burðardygga framtíð og umhvørvi.

DNV Føroyar við skrivstovu á Vestaru Bryggju í Tórshavn er partur av DNV-samtakinum, við høvuðsskrivstovu í Noregi, og hava vit havt fulltíðar skrivstovu í Føroyum í 41 ár. Okkara eind virkar eftir sama leisti sum deildirnar í útlandinum, og eru vit ein partur av altjóða netverkinum og gera regluliga arbeiðir uttanlands, eins og vit kunnu fáa útlendingar higar, um tað krevst. Í Føroyum starvast 5 fólk, og leggja vit stóran dent á at kunna veita eina góða tænastu innan øll tey økir, sum tað føroyska samfelagið hevur brúk fyri í einari altjóða gerð.

Nógvir føroyingar og føroysk virkir arbeiða á altjóða marknaðinum, so tað er sera týdningarmikið at hava ein sterkan altjóða stovn sum DNV í Føroyum, mannaðan við føroyingum, eins og vit hava føroyingar í starvi uttanlanda.

## Klassing av skipum

DNV Føroyar er ivaleyst fyrst og fremst kent fyri klassing av skipum.

Hetta arbeiði fer longu ígongd, tá skipið verður teknað, við at vit góðkenna tekningar og gera útrokningar.

Undir bygging sýna vit skipið og tryggja við sýni, royndum og testum at skrokkur, maskinarí, el og mangt annað lúka tey krøv ið verða sett. Vit góðkenna, sýna og testa eisini trygdarútgerðina umborð. Har, tað krevst, góðkenna vit eisini skiparakst-urin eftir altjóða ISM og ISPS krøvum.

mid_og_magn_2_2009:mid_og_magn_blatt 6/7/09 16:36 Page 19

# umhvørvið

Tá skipið er farið í sigling, sýna vit tað regluliga og í minsta lag 1 ferð um árið fyri at tryggja, at skipið framvegis lýkur tey krøv, tað skal, og í fleiri førum kanna vit eisini, at skiparaksturin er í lagi, og at tann ábyrgd ið liggur á reiðarí og manning verður tikin í álvara.

Vit hava í nógv ár, saman við øðrum pørtum í føroysku sjóvinnuni, roynt at menna og skipa okkara vinnu betur og ynskja framvegis at verða við til at menna hugburðin til góðsku, trygd og umhvørvið. Vit meta, at hetta hevur stóran týdning fyri okkum, um vit ynskja eina altjóða skipavinnu.

## Burðardygg veiða

Nógv fokus er í løtuni á burðardyggari veiðu. Marine Stewardship Council (MSC) er ein altjóða óheftur felagsskapur, sum hevur megna at gjørt og marknaðarført ein slíkan standard, sum bæði umfatar sertifisering av burðardyggari veiðu og sporføri (Chain of Custody).

Marine Stewardship Council, sum stovnur, sertifiserar ikki sjálvur, men hevur lagt uppgávuna út at sertifisera burðardygga veiðu og burðardyggari fiskaframleiðslu til fyritøkur, sum millum annað Det Norske Veritas (DNV).

Ein MSC sertificering kann býtast í 2 partar, fyrst kemur sjálv sertifiseringin av tí burðadyggu veiðuni, sum gevur veiðuni ein MSC status, næst kemur sertifisering av fyritøkum, sum keypa og framleiða MSC sertifiseraða veiðu. Henda sertifisering nevnist “Chain of Custody”.

Meðan MSC sertifisering av veiðu gongur út uppá stovnsrøkt og burðadygga veiðu, so gongur “Chain of Custody” út uppá sporføri, fyri at tryggja, at vøran, sum liggur í søludiskinum, stavar frá einari MSC góðkendari veiðu. Fyri lætt at kenna aftur tílíka vøru, verður vøra, sum kundin sær í handlinum, merkt við MSC merki. Sí annars meira kunning á www.msc.org

## Matvøru sertifiseringar

Fleiri og fleiri kundar seta sum krav, at framleiðarar av matvørum hava eina sertifisering av teirra framleiðslu. Tað finnast nógvar matvørusertifiseringar; tær mest kendu og vanligu um okkara leiðir eru BRC, IFS, ISO 22000. Hesar eru allar grundaðar í HACCP (Hazard Analyzes Critical Control Points), tvs. tær taka støði í vandum, sum eru tengdir at matvøruframleiðsluni. BRC (British Retail Consortium ) og IFS (International Food Standard) eru sertifiseringar, sum handilsketur í Evropa hava sum standard fyri matvøruframleiðslu. ISO 22000 er ein líknandi standardur, men er internationalur.

Meira kunning er á www.dnv.com (www.brc.org.uk & www.ifs-online.eu & www.iso.org)

DNV is the Class for Fishing Industry



Classification: The Vessel
Safety, Quality, Environment, Strength

Certification: The Fish
**Sustainable fishing:**
MSC-certification
**Food Safety and Quality:**
ISO 22000, HACCP, BRC, IFS, Global GAP, ISO 9001

DNV leading provider of services for Managing Risk.

Det Norske Veritas
Tel: +298 353750
www.dnv.com

MANAGING RISK DNV

mid_og_magn_2_2009:mid_og_magn_blatt 6/7/09 16:36 Page 20

KJ HYDRAULIK
POWER & MOTION CONTROL

# Fjølbroyttur veitari til vinnuna

KJ HYDRAULIK er ein fjølbroytt fyritøka, sum veitir útgerð, eykalutir og tænastu til skipaflotan, flutningsvinnuna, entreprenørvinnuna og alivinnuna.



**Hydraulikk Pumpur**

Úrvalið av hydraulikkpumpum umfatar stempul-, veingja-, og tannhjólspumpur við fastari og variablari oljumongd, í øllum arbeiðstrýsti, ið tørvur er á.



**Hydraulikk Motorar**

Fullfíggjað úrval av skjótt-gangandi og seintgangandi hydraulikkmotorum, sum tannhjólsmotorar, gerotor motorar, stempulmotorar, veingjamotorar í føstum og variablum oljumongdum.



**Hydraulikk Ventilar**

Til stýring av einfaldum on/off funktiónum og stýring av oljufloði, trýsti og last, hava vit stórt úrval av manøvriventilum, servoventilum, trýst- og flóð ventilum, lasthaldiventilum, proportionalventilum og fjarstýringsventilum.



**Hydraulikk Filtur**

Úrvalið av hydraulikkfiltrum nøktar øll krøv til reinleika, oljumongd og trýst. Á goymslu er breitt úrval av filturhúsum og filtur elementum til hátrýst og hydraulikktangan, umframt off-line filturstøðir, ið m.a. taka vatn úr oljuni.

RAPP HYDEMA



**Spøl**

Sum umboð fyri Rapp Hydema kunnu vit bjóða hydraulisk og elektrisk spøl og spælskipanir til allar trolarar og nótabátar. Vit framleiða eisini hydraulisk og elektrisk spøl eftir kundans ynski. Lossispøl til lastbilakranar og sjókranar eru vanliga á goymslu.

PALFINGER



**Kranar**

Sum umboð fyri Palfinger lastbilakranar og Palfinger Marine sjókranar veita vit kranar úr 0,8tm til 150tm. Kranarnir fáast við allari nútímans útgerð, ið ger arbeiðið bæði skjótt, lætt og trygt. Nógv eykaútgerð til kranar kann eisini veitast.

JCB



**Entreprenørmaskinur**

Vit eru sølu- og tænastuumboð fyri JCB, Huddig og Vibromax entreprenørmaskinur, sum umfatar beltimaskinur til 46t., gummigedir upp til 20t, dumparar upp til 25t., rennigravarar upp til 13t., mini-beltimaskinur upp til 8t. og trumlir upp til 20t. Eisini veita vit útgerð og eykalutir til ymisk onnur sløg av maskinum.

IVECO MOTORS



**Motorar**

Vit umboða IVECO (FPT) marine dieselmotorar úr 20HK til 1800HK og generatoranlegg úr 29kw til 750kW. Teir nýggjur motorarnir eru sera økonomiskir og friðarligir og hava framkomna elektroniska stýring.

Kambsdalur & Tórshavn - Telefon 407000 - info@kj.fo - www.kj.fo

# Maskinmeistarin í brennideplinum

## Regin Olsen



**Hvørja útbúgving hevur tú?**
Eg var útbúgvin maskinsmiður á Tórshavnar Skipasmiðju í 1978, tók maskinist í 1980 og síðani maskinmeistara í 1983.

**Verandi starv:**
Maskinmeistari á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

**Nær fór tú fyrstu ferð til skips?**
Eg fór fyrstu ferð til skips í 1979. Eg var meistari á ídnaðarveiðu í Norðsjónum.

**Longsti túrur á sjónum:**
Longsti túrur eg havi verið úr Føroyum var í 5 mánaðir, men vit landaðu í Danmark og Hetlandi hesa tíðina.

**Hvørjum skipum hevur tú verið við?**
Við línuveiðu havi eg verið við Borgaranum við Labrador. Á ídnaðarveiðu við Føroyingi og Mariu. Nótaskipi við Christian í Grótinum, og við ferðaskipum var eg við Ternuni og gamla Teistanum.

**Hvat er størsta avbjóðingin hjá einum siglandi ella arbeiðandi maskinmeistara?**
Størsta avbjóðingin hjá ein maskinmeistara er at hann má alla tíðina fylgja væl við. Teknikkurin verður alla tíðina endurnýggjaður, so umráðandi er at fara á skeið so tað er møguligt at arbeiða við tólum og maskinum. Nú eru flestu maskinrúm og arbeiðspláss CTS teldustýrd, har man í kontrolrúminum ella á kontórinum kann stýra øllum; ígongsetan, lensing, varma, ventilatión og annað. Eitt hav av møguleikum, sum man ikki hevði fyri bert fáum árum síðani.

**Frítíðarítriv:**
Tá ið man hevur eitt arbeiði, sum eg havi, er ikki ofta so nógv frítíð. Sum oftast er man bundin, tá ið man er heima. Mær dámar væl at fara ein túr út til Svínoyar har barnaheimið er. Nakað av seyði havi eg eisini at hygga til. Ganga á fjall, hegna og fara ein túr út á víkina ein góðan summardag, tað er balsam fyri sálina.

Eitt frítíðarítriv hjá mær hesi seinastu árini er at fara til Íslands til Ástjørn. Ástjørn er eitt leguhús fyri børn og ung. Har fari eg fyri at gera fyrifallandi arbeiði. Eg eri júst aftur komin úr Íslandi, eftir ein sera góðan túr. Vit vóru á útferð úti í Vestmannaoyggjunum, har vit vitjaðu eitt av heimsins størstu lundalondum og eisini fingu vit eina frágreiðing um eldgosið í 1973, ið legði 400 hús í oyði.

**Bilur:**
Ein 7 pers. KIA Carnival.

**Telda:**
HP minifartelda og Toshiba fartelda.

**Hjúnarfelagi:**
Karin.

**Børn:**
Heðin 27, Hans Sólbjørn 23, Poul Ingi 21, Adelheid 18 og Regin 10.

**Besta bók:**
Umframt Bíbliuna er tað Feðgar á ferð, Havið og vit, Føroya siglingarsøga, Pílagrímsferðin, Minniligar hendingar eftir Edvard í Svínoy og Føroya Maskinskúli eftir Finnur Johansen.

**Besti sangur:**
Við Drangin í Reyðurók eftir Regin Justinussen og títt lív hevur virðið eftir Árna Jacobsen.

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum?**
At tað gongur tínum nærmastu væl, gongur væl í arbeiðinum og gongur okkara fakfelagi væl við at betra um sáttmálaviðurskifti hjá limum okkara.

**Hvat kann øsa teg?**
Eg eri ikki ein í øsir seg ofta, men tá ið eg kom í nevndina í Maskinmeistarafelagnum østi eg meg mangan um at tað kundi taka í so langa tíð at fáa sáttmálasamráðingar uppá pláss, og longsta tíðin fór til Fíggjarmálaráðið.

Óerligheit toli eg ikki. Eg øsi meg um fólk, sum ikki siga góðan morgun, tá ið tey koma til arbeiðis. Tað situr eftir frá tíðini á Skipasmiðjuni, har Kjartan og Poul stóðu og tóku ímóti tá ið vit komu til arbeiðis, segði man ikki góðan morgun so fekk man av at vita. Eitt sera gott lærupláss.

mid_og_magn_2_2009:mid_og_magn_blatt 6/7/09 16:36 Page 22

# 10 milliónir til nýtt fi










Tað var í samband við 50 ára haldið hjá Fiskirannsóknarstovuni, sum í sama viðfangi gjørdist Havstovan, at formaðurin fyri nevndina í Forskotsgrunni Fiskiflotans, Jákup Sólstein, boðaði frá, at grunnurin hevði samtykt at veita 10 mió. krónur sum eitt ískoyti til eitt nógv tiltrongt nýtt fiskirannsóknarskip.

Tað eru kanska ikki øll, sum eru greið yvir, hvaðani hesin peningurin stavar, og tað skal verða gjørd ein stutt frágreiðing um tað

Upprunin er tann inntøkutrygdarskipan fyri fiskimenn, sum varð sett í gildi fyri umleið 60 árum síðani við Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.

Høvuðsuppgávan var at tryggja fiskimonnum minstuløn. Men ásannað varð eisini, at neyðugt var at tryggja heimunum hjá fiskimonnum eitt útgjald, meðan menninir vóru burtur. Tí kom eisini ein forskotsskipan, sum tá var 300 kr. mánaðin.

Samstundis varð sett ein 3-manna nevnd, sum skuldi umsita hesar skipanir. Í nevndini var umboð fyri fiskimannafeløgini, reiðarafeløgini og løgtingið, sum átti formannin. Tá vóru fleiri fiskimannafeløg og reiðarafeløg. Nú er so bert eitt av hvørjum. Nevndin kom seinni uppá fimm limur, og yvirmannafeløgini fingu eisini umboð.

## Forskotsskipanin

Forskotsskipanin er tískil ein partur av inntøkutrygdini. Hon er í dag avmarkað til frystiskip, sum eru burtur í longri tíðarskeið. Tað er her tørvurin er, tí við longri túrum, kann tað taka langa tíð hjá reiðarunum at fáa goldið pening fyri veiðuna.

Forskotið verður sett til eina upphædd, sum er so mikið lægri enn inntøkutrygdin, at pláss er fyri øðrum útgjøldum, sum til dømis telefon og slíkt, sum verður keypt umborð. Í løtuni er tað kr. 19.000. Forskotið verður goldið hvønn mánaða afturút eftir umsókn hjá hvørjum einstøkum av manningini. Tá ið túrurin verður avroknaður, skal reiðarin gjalda útgoldnað forskotið + eitt avgreiðslugjald aftur til lønjavningargrunnin, samstundis sum upphæddin verður trekt av avrokningini hjá manningini. Er talan um minstulønartúr verður forskotið umroknað til minstuløn.

Forskotið verður fíggjað av eginognini hjá grunninum.

## Nýggj lóggáva

Seinast í 1990-unum varð framd ein nýggj lóggáva á hesum økinum. Fyrst varð forskotsskipanin tikin burtur úr, og gjørdur varð ein nýggjur

mid_og_magn_2_2009:mid_og_magn_blatt 6/7/09 16:36 Page 23

# fiskirannsóknarskip



*Tekning av nýggja havrannsóknarskipinum*

forskotsgrunnur, sum umsitur hesa skipan. Grunnurin hevur eina trý-manna nevnd mannað av Reiðarafelagnum, Fiskimannafelagnum og yvirmannafeløgunum.

Sjálvur lønjavningargrunnurin varð sum slíkur avtikin, og umsitingin av tess arbeiðsøkjum varð lagt beinleiðis undir eina Lønjavningarstovu sum partur av Fiskimálaráðnum.

Nýggi forskotsgrunnurin yvirtók eginognina hjá lønjavningargrunninum, og hon stavaði í høvuðsheitum frá gjøldunum, sum reiðarar rindaðu fyri forskotið umframt rentur, sum reiðarar gjalda fyri at gjalda forskotið ov seint aftur til grunnin.

Gongdin við fjarflotanum hevur verið tann, at hann er minkaður nógv seinastu árini. Nú eru bert trý rækjuskip, eini 4-5 flakatrolarar og kanska onkur frystilínubátur eftir. Hetta merkir eisini minni tørv á fígging frá forskotsgrunnum.

Tí er eginogn eisini nakað nógv hægri, enn tørvurin hjá grunninum er. Tískil hevur nevndin viðgjørt spurningin



um, "avlopseginpeningurin" ikki kundi verið nýttur til okkurt tiltak, sum kann vera til gagns fyri fiskivinnuna á sjónum, og harvið fyri alt samfelagið.

## Fiskirannsóknarskip besta boð

Her var skjótt semja um, at eitt fiskirannsóknarskip var besta boð. Nógv hevur verið tosað um tørvin fyri tí, men ráðini verða ikki mett at vera tey bestu fyri tíðina.

Hesar 10 mill. muna ikki nógv einsamallar, men tær eru so ein byrjan og ein eggjan til politiska myndugleikan at gera sítt. Tað skal tó sigast, at fyri at leysgeva hendan pening, er neyðugt við eini lógarbroyting, sum politisku myndugleikarnir siga seg vilja fremja.

Í nevndini fyri forskotsgrunnin eru umframt formaðurin Jákup Sólstein, eisini Óli Jacobsen og Herman Bærentsen. Umsitingini liggur undir Lønjavningarstovuni, har Hanni Thomsen er leiðari.

Skrivað: Óli Jacobsen





# Limirnir eru samlagstryggjaðir

*Tryggjaðir eru virknir limir í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Maskinmeistarafelagnum og Motorpassarafelagnum og hjúnafelagar hjá limi ella sambúgvi, um hesi hava búð saman í 2 ár ella meira.*

**Innliman**
Tryggingin við deyða tekur við, tá ið limur verður settur í starv ella mynstrar.

Trygging við Hættisliga sjúku tekur í fyrsta lagi við ein mánað eftir at limurin er komin í starv ella mynstrar.

Um limur, av sjúku ella vanlukku, missur arbeiðsføri til 1/3 ella lægri, heldur limur fram í tryggingini, gjaldsfrítt, í upp til 3 ár.

**Útgjald**
Samlagstryggingi gevur útgjald av upphædd við deyða og Hættisliga sjúku. Samlagstryggingin er galdandi bæði í arbeiði og frítíð, annars sambært tryggingartreytum.

Tryggingarhæddin við deyða verður útgoldin til næsta avvarðandi uttan so, at onnur skrivlig avtala er gjørd við LÍV.

Næsti avvarðandi er í fyrsta lagi hjúnafelagi. Um ongin hjúnafelagi er, verður útgoldið til børn (lívsarvingar). Eru ongir lívsarvingar, verður útgoldið sambært arvalógini.

Ynskist tryggingarhæddin útgoldin til onnur enn næsta avvarðandi t.d. sambúgva, skal hetta fráboðast skrivliga til LÍV. Sí annars heimasíðuna www.liv.fo, undir tryggingar, samlagstrygging.

Tryggingarupphæddin við Hættisliga sjúku og um hjúnafelagi doyr, verður útgoldin til limin.

Tryggingartreytirnar áseta neyvari reglur – tær kunnu heintast á www.liv.fo undir tryggingar – samlagstrygging.

Doyr limur innan 3 mánaðir frá tí, at Hættisliga sjúkan er staðfest, verður útgjaldið mótroknað í útgjaldinum við deyða.

Um so er, at ein av omanfyri nevndu sjúkum er staðfest áðrenn innliman í tryggingina, verður endurgjald ikki veitt, um sama sjúka rakar av nýggjum. Limur missir ratt til fleiri útgjold fyri Hættisliga sjúku, tá útgjald einaferð er farið fram.

Sjúka má fráboðast innan 2 ár eftir at sjúka er staðfest, tí krøv um endurgjald fyrnast.

Er illkynja krabbamein staðfest áðrenn innliman í tryggingina, er eingin fullnaður fyri krabbamein, uttan mun til, hvat slag av krabbameini rakar av nýggjum. Tó so, at um tað frammanundan er staðfest í mesta lagi ein illkynja krabbameinssjúka, um sjúkuviðger av hesari sjúku er endað fyri meiri enn 7 árum síðani, er ein nýggj krabbameinssjúka tó fevnd av tryggingini, treytað av at einki afturfall hevur verið í nevnda tíðarskeiði.

Tryggingin fevnir eisini um Hættisliga sjúku fyri børn hjá liminum.

Tryggingarupphæddin verður útgoldin, um so er, at barn fær staðfest eina av niðanfyri nevndu sjúkum.

- Illkynjaðar krabbameinssjúkur
- Menigitis
- Nýrasvignan
- Miss av sjónini
- Miss av hoyrnini
- HIV-ígerð, av blóðflutningi
- AIDS

Hetta er galdandi fyri børn í aldrinum 6 mánaðir til 18 ár. Fyri miss av sjónini og/ella miss av hoyrnini, er tó galdandi, at barnið skal vera 2 ár ella eldri, tá ið hetta verður staðfest.

**Tryggingin fevnir um hesi børn:**
- Biologisk børn
- Ættleidd børn
- Fosturbørn, treytað av, at hesi eru skrásett at búgva á sama bústaði sum limurin

Hevur eitt barn fingið staðfest eina Hættisliga sjúku, áðrenn innliman í tryggingina, er henda sjúka ikki fevnd av tryggingini. Verður tryggingarupphæddin útgoldin, fellur tryggingin av viðkomandi barni burtur.

**Gjald**
Tryggingargjaldið er við gildi frá 1. jan. 2009 kr. 290 um mánaðin.

Fyri sjófólk kann gjaldast kr. 20 fyri hvønn mynstraðan dag.

Gjaldið skal rindast saman við eftirlønargjaldinum.

**Upphæddir**
Tryggingarupphæddir: Galdandi frá 1. januar 2009
Tryggingin er galdandi til limur er 67 ár.
Um limur doyr: kr. 700.000,-
Høvuðsupphæddin lækkar frá 50-ára aldri við kr 25.000 hvørt ár til upphæddin er kr. 300.000
Um hjúnafelagi/sambúgvi doyr: Hálv høvuðsupphædd
Um limur fær hættisliga sjúku: kr. 100.000,-
Um barn hjá limi fær hættisliga sjúku: kr. 50.000,-

Gjaldið skal ikki roknast sum skattskyldug inntøka á lønarseðlinum. Við ársskiftið fráboðar LÍV til TAKS, um at tryggingargjaldið skal roknast sum skattskyldug inntøka.

Gjaldið skal flytast á konto 6460-180.702.3 í Føroya Banka.

**Hættislig sjúka**
Samlagstryggingin fevnir frá eisini um Hættisliga sjúku, ið veitir útgjald, um ein av nevndu sjúkum verður staðfest.

- Illkynjaða krabbameinssjúku
- Blóðtøpp í hjartanum
- „Bypass"-skurðviðgerð - Ballónvíðkan
- Hjartaloku skurðviðgerð
- Heilabløðing/slag
- Bjølgar á lívæðrum í heilanum,
- Ávísir góðkynjaðir vøkstrir í heila ella mønu
- Disseminerað sklerosa
- ALS (amyotrofisk lateralsklerosa)
- Vøddasvinn
- HIV-ígerð, av blóðgávu ella arbeiðstreytaðari smittu
- AIDS (eyðkvæmi)
- Nýrasvignan
- Størri vevnaðarflutningur
- Miss av sjónini
- Miss av hoyrnini
- Creutzfeldt-Jacob sjúka
- Parkinsons sjúka - Paralysis agitans

**Framhaldstrygging**
Tá ið limur fer úr samlagstryggingini, hevur hann rætt til at tekna framhaldstrygging, ið er persónlig trygging við somu upphædd, sum var galdandi fyri samlagstryggingina, uttan at lata heilsuváttan.

Framhaldstrygging skal teknast áðrenn 2 mánaðir aftaná, at limurin er farin úr samlagstryggingini. Gjaldið er ikki tað sama sum í samlagstryggingini, men ásett fyri tann einstaka. Hjúnafelagi kann ikki tekna framhaldstrygging. Avtala kann gerast um framhaldandi vanlukkutrygging.

**Leiðbeining**
Ynskist nærri leiðbeining ert tú vælkomin at seta teg í samband við FØROYA LÍVSTRYGGING, Tlf. 31 11 11

mid_og_magn_2_2009:mid_og_magn_blatt 6/7/09 16:36 Page 25

# Maskinistar og sparingar

**Páll Hansen formaður Maskinmeistarafelags skrivar:**

Eingin maskinistútbúgving byrjar í august í ár, og bachelor útbúgvingin verður møguliga ella kanska ikki fyrr enn í 2010. Soleiðis tykist veruleikin at síggja út í løtuni.

Leiðslan á Vinnuháskúlanum hevur boðað frá, at hon sær seg noyddan at siga trimum royndum lærarum upp, tí skúlin skuldi spara 2,2 mió. kr.



Samstundis sigur formaðurin í fíggjarnevndini í fjølmiðlunum, at tað er Mentamálaráðið og leiðsla skúlans, sum hava tryggjað sær, at lønarpuljan á fíggjarlógini fer úr góðum 14 mió. kr. niður í 12.873 mió. kr.

Eg skal ikki taka dagar ímillum hvør sigur hvat, men ein felagsnevnari fyri Mentamálaráðið, løgtingsins fíggjarnevnd og leiðslu skúlans merkir stagnatión.

Hetta merkir, at skúlin ikki fer at megna at fylgja við krøvunum um alsamt hækkandi útbúgvingarstøði, sum framtíðin setir.

Maskinistútbúgvingin tekur 9 mánaðir og gevur eitt internationalt vinnubræv, STCW góð kent, ið gevur loyvi at mynstra sum maskinsjefur á skipum upp til 2.999 KW.

Henda útbúgving er sum skraddaraseymað til tann føroyska flotan. Millum 80 og 85% av skipinum í føroyska flotanum hava eitt maskinarí, ið er undir 3.000 KW. Útbúgvingin er eisini sera væl egnað til farmaskip við maskinorku upp til 3.000 KW. Tí er tað umráðandi fyri okkum, at henda útbúgving bæði verður styrkt og ment.

Í Danmark, sum vit ofta samanbera okkum við, hevur man kunna tikið bachelor útbúgving síðani 2007. Kemur henda útbúgving ikki skjótt hjá okkum, so koma vit at standa aftanfyri grannalondini á hesum øki.

Ein av fylgjunum av hesum kann gerast, at næmingar fara av landinum fyri at fáa fulla útbúgving.

Eg hoyri sjálvur til tað ættarliðið, sum skuldi av landinum fyri at fáa fulla maskinmeistaraútbúgving, og vóni ikki at hetta fer at endurtaka seg. Tí verri er tað helst tað, vit fara at síggja í framtíðini.

Ofta verður tikið til, at vit mugu hava fleiri bein at standa á. Nýggja FAS-skipanin kann gerast eitt av hesum beinum. Vit hava sera dugnalig fólk, sum gera eitt gott arbeiðið fyri at menna hesa skipan. Samstundis mugu vit sanna, at vit mangla yvirmenn – eisini maskinistar.

Tí er tað ófatuligt at myndugleikarnir skerja á hesum øki; ikki minst tá vit hugsa um, hvørjum vit liva av. Tað er ongin loyna, at skúlin hevur brúk fyri betri umstøðum. Og vit hava brúk fyri hesi vinnugrein og nýggjum útbúgvingarmøguleikum eisini til frálandavinnuna.

Nú eru skjótt 5 ár síðani skúlarnir vóru samanlagdir. Tí mæla vit til, at farið verður undir at eftirmeta samanleggingina, og samstundis gera eina visjón til tey komandi 5 árini. ■






# Próvhandan á Vinnuh

**Fríggjadagin 19. juni var hátíðarhald á Vinnuháskúlanum. 32 lesandi hava lokið prógv, 30 menn og 2 kvinnur. Til hátíðarhaldið vóru røður hildnar og prógv handað skipsførarum, maskinmeistarum og skiparum. Um 150 fólk vóru komin saman fyri at luttaka í hátíðarhaldinum.**

**Stjórin Hans Johannes á Brúgv bjóðaði vælkomin, varaskúlastjórin Petur Hans Dahl flutti fram røðu. Eli Lassen var gestarøðari. Umboð fyri Maskinmeistarafelagið, Skipara- & Navigatørfelagnum, Mærsk og Søfartensledere, góvu næmingunum góð orð við á ferðini.**



Til prógvhandanina flutti Petur Hans Dahl varaskúlastjóri fram røðu. Hann tók m.a. soleiðis til:

At kvinnurnar ikki halda seg aftur, sæst við tað, at 2 kvinnur fáa nautiskt prógv í dag. Tær eru Durita Christophersen úr Vestmanna og Albjørg Joensen úr Kollafirði.

Durita verður skipsførari og Albjørg skipari.

Um 2½ ár verður ein onnur kvinna her á skúlanum væntandi liðug sum maskinmeistari.

Hetta prógv, tit í dag fáa, óansæð um tað er maskinmeistara-, skipara- ella skipsføraraprógv, er eitt altjóða STCW-áteknað prógv, sum gevur tykkum møguleika at arbeiða kring allan knøttin. Heimurin liggur opin fyri tykkum, og møguleikarnir eru næstan óendaligir, tað ræður bert um hjá tykkum at finna tað arbeiði, ið hóskar tykkum best. Við góðum handalag kunnu tit náa langt. Skúlin hevur roynt at geva tykkum maskinmeistarum og skipsførarum eina barlast og kann ikki læra tykkum meira burtursæð frá onkrum serskeiðum, sum tit kunnu koma aftur til.

Vit hava steðga 18 ungum monnum at koma á skúla vegna sparingar komandi skúlaár.

Hvar fara so hesir? Uttan iva út í arbeiðsloysi!!

Summir fara kanska á skúla í Danmark.

Hetta er fyrstu ferð í skúlans 116 ára søgu, at atgonguavmarkingar eru settar í verk.

Sjálvt í Føroya størstu kreppu fyrst í 1990-unum dugdu myndugleikarnir at síggja virði av okkara útbúgving, og vit tóku øll inn við tí úrsliti, at skúlin varð fyltur til evsta mark.



*Páll Hansen handaði Ellindi Grástein gávu frá Maskinmeistarafelagnum*



*Ernst Súni Ennigarð fekk gávu frá Skipara- og Navigatørfelagnum fyri hægsta próvtal.*

# háskúlanum



**SKIPARAR:**
Antenes M. Joensen, Andreas Jacobsen, Davis Dalbø, Ditlev Winther, Ernst Súni Ennigarð, Fríðrik Sivertsen, Albjørg Joensen, Helgi Luid Solmunde, Høgni B. Rasmussen, Jan Vestergaard, Jógvan Joensen, Johan K. Jacobsen, Kári L. Dahl Christiansen, Martin S. I. Joensen, Pál Eirikur Vang, Pætur Niels Holm, Snæbjørn Berg, Súni Gaard.

**Virðislønir:**
1. Ernst Súni Ennigarð, klokkusett frá Faroe Agency
2. Albjørg Joensen, klokkusett frá Faroe Ship
3. Pál Eirikur Vang, kikara frá Hempel´s Fond
Virðisløn fyri hægsta próvtal:
Ernst Súni Ennigarð, barografur frá Skipara- & Navigatørfelagnum.



**MASKINMEISTARAR:**
Ellindur Grástein, Hans Jørgin Nicolajsen, Oystan Jensen, Poul Dan Kjærbo, Pætur Klein Jacobsen, Ragnar Slættanes, Símin Heimustovu, Ingi Weihe, Johan Berg, Magni Flagstad Berg.

**Virðislønir:**
1. Oystan Jensen, fototól frá Føroya Banka
2. Ellindur Grástein, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum
Ídnisvirðisløn var latin Poul Dan Kjærbo, gull ur frá A. P. Møller

**SKIPSFØRARAR:** (ongin mynd)
Hesir skipsførarar fingu prógv: Durita Christophersen, Sofus K. Joensen og Mourits Danberg.

**Virðislønir:**
1. Sofus K. Joensen, gullur frá A. P. Møller 2. Durita Christophersen, klokkusett frá Tryggingarfelagnum Føroyar 3. Mourits Danberg, pennasett frá Søfartens Ledere.

# Tíðindi frá Maskinm

## Maskinmeistarafelagið á NMF-fundi

Felagsskapurin fyri norðurlendsk maskinmeistarafeløg NMF helt fund í Keymannahavn tann 6. apríl.

NMF hevur tveir fundir um árið og limirnir skiftast um at vera vertir. Høvuðsendamálið hjá felagsskapinum er at kunna hvønn annan um støðuna hjá maskinmeistarum í teimum ymisku londunum. ➔



*Frá vinstru: Páll Hansen FØ, Guðmundur Ragnarsson ÍS, Keld B. Hansen DK (Metal Søfart), Per Jørgensen DK (MMF), Kaare L. Nielsen DK (MMF), Mikael Huss SV, Leif Wikström FI, Bjørn R. Gutterud NO.*

## Føðingardagar hjá limum okkara

Ein fastur táttur í MIÐ & MAGN verður settur av til at ynskja teimum limum, sum hava rundar føðingardagar, tillukku við degnum.

Hesir limir fylla 40, 50 ella 60 ár fram til næsta blað, sum verður givið út oktober mánað. Vit ynskja teimum tillukku:

**60 ár**

| | |
|---|---|
| Hákun Andreasen | 5. september |
| Kristian í Túni | 26. september |

**50 ár**

| | |
|---|---|
| Tom Danielsen | 7. juli |
| Petur Henry Gaard | 22. august |
| Torry Petersen | 4. september |
| Jóan Magnus Jensen | 4. september |
| Olaf í Garði Joensen | 15. september |

**40 ár**

| | |
|---|---|
| Magni Flagstad Berg | 1. juli |
| Janus Mortensen | 9. juli |
| Esmar Múller | 20. august |

## Brot úr dagbókini hjá Ma

**2. apríl: Nóatun**
Fiskirannsóknarstovan 50 ára stovningardag.

**6. apríl: NMF fundur í Keypmannahavn**
Møttir vegna MF Páll og Sjúrður.
Myndir og frágreiðing er send Mið og Magn.
Eisini myndir frá gávuhandan til tað Íslendska felagið 100 ár.

**16. apríl: MF**
Fund við P. Nielsen um limamál.

**20. apríl: MF**
Fundur við grannskoðara felagsins.

**21. apríl: Advokatskrivstovan**
Fyrireiking av gerðarættarmáli millum MF, FSN og Lønardeildina.

**23. apríl: FSN**
Fundur í blaðnevndini hjá Mið og Magn.

**24. apríl: MF**
Fundur við FMR og Strandferðsluna, undirskrivaðan av sáttmála. (Myndir og tekstur eru send Mið og Magn)

**30. apríl: MF**
Nevndarfundur: 16 mál til viðgerðar, m.a. sáttmáli við Sandgrevstur og Sandsøluna.
Avtala við Maskinmestrenes Forening í DK og MF. Semja var um at gera eitt uppskot um avtalu.
Samstarvsavtala gjørd við FSN og Starvsmannafelagið um alment lønt á sjónum.

**6. mei: Lívstrygging**

**7. mei: MF**
Fundur við maskinmeistararnar á Landssjúkrahúsinum.

**8. mei: Norðborg**
Regin umboðar felagið framsýningartúr.

**11. mei: Portugalið**
MF, FSN fund við FAS-umsitingina og nøkur svensk reiðarí um innflagging.

**12. mei: MF**
MF, FSN og Starvsmannafelagið fund um sáttmálan fyri Strandferðsluna og alment lønt á sjónum.

**13. mei: Skipaeftirlitið**
Fundur um komandi broytingar í kunngerð um trygdarskeið, og siglingstíð við farmaskipum.

# meistarafelagnum

## Maskinmeistarafelagnum

**14. mei: Fiskimannafelagið**
Saman við P. Nielsen advokati bleiv støðan umrødd, nú fleiri skip koma inn í FAS.

**22. mei: FSN**
Fundur í blaðnevndini hjá Mið og Magn, næsta útgáva.

**26. mei: Lív**
Lív og manningarfeløgini tosa saman um eftirlønarskipana hjá teimum, sum sigla undir FAS.

**29. mei: MF**
Nevndarfundur 17 mál til við gerðar.
Millum annað avtala við garnaskip.
Og fyrireikaðan av fleiri rættar málum.
Fremmandir sjómenn.
Tættari samstarv innan FAS.

**2. juni: Klaksvíkar Sjómansheim**
Manningarfeløgini høvdu limafund.

**12. juni: MF**
Eykanevndarfund, 7 mál til viðgerðar
Kærumál:
FAS Fremmandir sjómenn.
Brúka fasta gerðarrættin meira
Sandbátar Nýtt upplegg sendast.
Sjóvinnuráðið

**16. juni: Fíggjarmálaráðið**
Pensjónsnýskipan- Uppskot til eina haldføra pensjónsskipan fyri Føroyar

**18. juni: FSN**
Fundur í blaðnevndini Mið og Magn næsta útgáva.

**19. juni: Vinnuháskúlin**
Prógvhandan

**23. juni: Hotel Føroyar**
Fíggjarmálaráðið.
Sáttmálasamráðingar og sáttmálaásetingar.

**25. juni: MF**
Fundur við manningarstjóran hjá Furetank.

**26. juni: MF**
Nevndarfundur.

**29. juni: FSN**
Fundur í blaðnevndini Mið og Magn næsta útgáva.

Maskinmeistarafelagið hevur regluliga nevndarfund síðsta fríggjadag í hvørjum mánað kl 13.00.

## Maskinmeistarafelagið á NMF-fundi:



*Per Jørgensen, forseti í NMF handar Guðmundur Ragnarsson føðingardagsgávu.*

Her verður serliga hugsað um sáttmálaviðurskiftir og útbúgving, men eisini generelt um hvat hendir innan vinnugreinar, sum er viðkomandi fyri maskinmeistarar.

Vanliga verður eisini ein fundarsamtykt gjørd um eitt ávíst evni.

Á fundinum hesaferð snúðu framløgurnar seg nógv um lokalu ávirkanina av altjóða búskaparkreppuni. Samanumtikið var semja um, at hóast kreppu, so eru tað ikki nógvir maskinmeistarar í norðanlondum sum ganga arbeiðsleysir og tað eru heldur ikki nógvar ábendingar um at soleiðis verður. Tvørturímóti so tykist eftirspurningurin eftir maskinmeistarum at vera vaksandi og hetta er eitt úrslit av, at samfeløgini støðugt mennast tøkniliga og tað krevur væl útbúgvið fólk til at røkja og umsita allan tann tekniska útbúnaðin.

Semja var eisini um, at tað er neyðugt at halda eitt vakið eyga við, at útbúgvingarnar eru á einum hóskandi støði og støðugt verða tillagaðar teimum broyttu og/ella øktu førleikakrøvunum.

Feløgini fara framvegis at eggja ungfólki í Norðurlondum at fáa sær maskinmeistaraútbúgving.

NMF viðgjørdi hesaferð eisini ætlanir hjá ES um ein politikk innan sjóflutning og samtykti at taka undir við hesum hugsanum. Hetta verður fráboðað í tíðindabrævi, sum er sent út aftaná fundin.

Tann 20. februar fylti íslendska maskinmeistarafelagið 100 ár og í hesum sambandi handaði Per Jørgensen, forseti í NMF, eina gávu til Guðmund Ragnarsson, formann í íslendska felagnum.



*Guðmundur Ragnarsson takkar fyri gávuna.*

mid_og_magn_2_2009:mid_og_magn_blatt 6/7/09 16:37 Page 30

# Tíðindi frá Skipara- og

## Stórur áhugi fyri FAS

Fleiri skip eru komin undir føroyskt flagg seinastu tíðina, og sum vit hava frætt, so eru enn fleiri ávegis. Manningarfeløgini eru farin undir at gera kollektiva avtalu fyri manningarnar á hesum skipum. Innan altjóða sjóvinnu er mannagongdin tann, at ein sáttmáli verður gjørdur fyri hvørt skipið. Sáttmálarnir taka sum oftast støði í ITF minimum standard ásetingum, og eru galdandi fyri alla manningina. Tó er onki í vegin fyri, at hvør einstakur sjómaður kann gera eina betri avtalu sjálvur.

Um eingin kollektivur sáttmáli finst, so er vandi fyri at ITF ment lýsir føroyska flaggið sum eitt hentleikaflagg. Tað sum tá kann henda, er at skipini verða ikki lossaði fyrr enn kollektivur sáttmáli er gjørdur. Samráðingarrætturin liggur fyrst og fremst har sum skipið er skrásett. Um hesin rættur ikki er brúktur, so er frítt slag hjá einum og hvørjum at krevja henda rætt.

Okkara grannalond, sum eru stórar sjóvinnutjóðir hava nógvar fremmandar sjómenn við sínum skipum. Har fáa manningarfeløgini stórar inntøkur, sum avgreiðslugjald fyri slíkar sáttmálar. Føroysku feløgini eru nú farin undir hetta arbeiðið, Vit hava fingið bæði kunnleika og ráðgeving frá okkara norðulendsku samstarvsfeløgum. ➔


**Ein depil innan skipatænastur**

www.mest.fo

At smíðja, umbyggja og umvæla skip er okkara avbjóðing. Men **MEST** er eisini so nógv annað.



**Vit bjóða m.a.**

- Tænastur innan stál, el, hydraulikk, timbur og máling
- Landsins størstu eykalutagoymslu
- Nýmótans smiðju í nýggjum umhvørvi
- Teldustýrdar skerimaskinur
- Projekt- og teknistovuarbeiði
- Stórar bedingar og turrdokk
- Leigu av sleipibátum og kranum
- Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)

MEST

MEST
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo


## Brot úr dagbókini hjá Skipa

**1. apríl: FSN**
Nevndarfundur: Til viðgerðar m.a. støðutakan til granskingarverkætlan um inntøkur frá sjómonnum, sum sigla við útlendskum skipum.
Aðalfundur hjá SP/F Brúgvin, sum eigur skrivstovubygningin hjá FSN.

**2. apríl: Runavík**
Undirskriving av sáttmála við P/F Frakt og Sandsøluna.

**2. apríl: Nóatún**
Fiskirannsóknarstovan hevði 50 ára stovningardag og broytti navn til Havstovan.

**14. apríl: Dómhúsið**
Tvingsilsøla av Roc Amadour.

**17. apríl: CMM**
Kunnandi fundur um shipping útbúgving fyri navigatørar og maskinmeistarar á Syddansk Universitet.

**20. apríl: Dómhúsið**
Dómsviðgerð av rættarmáli um uppsagnarhýru fyri tveir limir. Dómur varð avsagdur sama dag. FSN fekk fult viðhald.

**21. apríl: Advokatskrivstovan**
Fyrireiking av gerðarrættarmálið um avpáking fastar frídagar hjá skiparum og maskinstjórum umborð á Smyrli.

**23. apríl: FSN**
Fundur í blaðnevndini hjá Mið og Magn.

**27. apríl: Fíggjarmálaráðið**
Roynd at finna semju um tænastumenn.

**30. apríl: Lívstrygging**
Lív kunnar fakfeløg um gongdina og ætlaðar broytingar.

**1. mei: FSN**
Fundur við Jens Wang advokat um rættamál sum felagið førir vegna ein lim

**8. mei: Norðborg**
Framsýningartúrur fyri innbodnum.

**11. mei: Portugalið**
Fundur við FAS-umsitigina og nøkur svensk reiðarí, tosað var m.a. um hvør skal hava samráðingarrættin fyri útlendskar sjómenn við FAS skipum.

**12. mei: Maskinmeistarafelagið**
FSN, MF og Starvsmannafelagið hittust at umrøða sáttmálan fyri Strandferðsluna.

mid_og_magn_2_2009:mid_og_magn_blatt 6/7/09 16:37 Page 31

# og Navigatørfelagnum

## para- og Navigatørfelagnum

**13. mei: Skipaeftirlitið**
Øll vinnan var boðin til fund at umrøða komandi broytingar í kunngerð um trygdarskeið og møguligar broytingar í kravi um siglingstíð við farmaskipum.

**14. mei: Fiskimannafelagið**
Manningarfeløgini og Páll Nielsen advokatur hittust at umrøða støðuna nú fleiri skip koma inn í FAS.

**19. mei: Norðurlandahúsið**
Veðurlagsráðstevna í sambandi við fyrireiking til COP 15 fundin í Keypmannahavn í desember mánað. Sum skiltist á Løgmanni so eru Føroyar nú til reiðar at gera bindandi avtalu um útlát av veðurlagsgassum.

**20. mei: FSN**
Nevdarfundur, til viðgerðar var millum annað samráðingarrættur fyri FAS og ósemja við Lønardeildina fyri tænastumenn við Fiskiveiðeftirlitinum.

**22. mei: FSN**
Blaðnevndin fyri Mið og Magn hittist at fyrireika næstu útgávu.

**26. mei: FSN**
Manningarfeløgini og Heini Lútzen frá Lív tosa saman um eftirlønarskipan hjá teimum, sum sigla undir FAS skattaskipanini.

**27. mei: Fíggjarmálaráðið**
FSN og Lønardeildin royna at fáa eina loysn á drúgvari ósemju um tænastumenn hjá Fiskiveiðeftirlitinum.

**28. mei: Hafnia**
Realurin hevði umboðsráðsfund. Roknskapurin var framlagdur, gongdin og útlitini fyri fiskiflotan vóru umrødd.

**29. mei: Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráðið ummælti uppskot til kunngerð um trolbátar í bólki 4 T.

**2. juni: Klaksvíkar Sjómansheim**
Manningarfeløgini høvdu limafund. Til umrøðu var m.a. nær skal manning sigast upp, tá skip verða løgd og seinni seld av landinum. Eisini varð tosað um støðuna hjá línuskipum og óvanliga litla inntøkan, sum hevur verið higartil í ár. Ætlaðar skerjingar í inntøkutrygd og sjómannaskattinum fingu nógva umrøðu. Semja var um at tiltøk skulu setast í verk um skerjingar fara fram.

### Stórur áhugi fyri FAS

Um FAS- skipanin gerst ein stór skiparskráseting, so kunnu føroysku feløgini fáa eitt munandi íkast til raksturin í avgreiðslugjøldum. Tað skuldi sum frálíður, gjørt feløgini før fyri, at veita limum sínum eina betri og bíligari tænastu.

## Føðingardagar hjá limum okkara

Ein fastur táttur í MIÐ & MAGN verður settur av til at ynskja teimum limum, sum hava rundar føðingardagar, tillukku við degnum.

Hesir limir fylla 40, 50, 60 ella 70 ár fram til næsta blað, sum verður givið út oktober mánaði. Vit ynskja teimum tillukku:

**70 ár:**

| | |
|---|---|
| Páll Poulsen | 5. juli |
| Jákup Lamhauge | 7. juli |
| Dánjal Viðoy | 8. juli |
| Ernst Kass | 9. juli |
| Niels Jacob T. Nielsen | 11. juli |
| Elias Lervig | 19. august |
| Pauli Nolsøe Vang | 18. september |

**60 ár:**

| | |
|---|---|
| Sørin Jacobsen | 13. juli |
| Tom Herik Haraldsen | 9. august |
| Leivur Olsen | 8. september |
| Johannus Anthoniussen | 13. september |

**50 ár:**

| | |
|---|---|
| Karmal Olsen | 13. juli |
| Fróði Thorsteinsson | 24. juli |
| Mortan Mortensen | 5. august |
| Uni Kjærbæk | 10. august |
| Pauli Poulsen | 9. september |
| Christian Gudmund Henriksen | 16. september |
| Julian Hansen | 29. september |

**40 ár:**

| | |
|---|---|
| Jan Nón Bjartalíð | 16. juli |
| Kaj Otto Frederiksberg | 24. juli |
| Rúni Niclassen | 12. august |
| Terji Thomsen | 15. august |
| Jaspur Eliasen | 16. august |
| Dánjal Jákup P. Vilhelm | 18. august |
| Arvid Petersen | 11. september |
| Mikkjal Østerø | 25. september |

# Eftirløn undir FAS

Manningar undir FAS skipanini hava eina heilt serliga eftirlønarskipan, har inngjøldini eru av skattaðum peningi. Endamálið er at finna eina skipan, har bæði limur felagsins og reiðarin fáa sum frægast burturúr.

## Nýggjur sáttmáli

1. mars 2009 kom nýggjur sáttmáli í gildi millum manningarfeløgini og Reiðarafelagið fyri Farmaskip, galdandi fyri manning undir FAS skipanini. Tað sum er serligt við hesi eftirlønaravtaluni er, at inngoldið verður av skattaðum peningi.

Vanliga verða eftirlønargjøld goldin av arbeiðsgevaranum, áðrenn skatt, t.v.s. at gjaldið skal ikki roknast uppí skattligu inntøkuna. Orsøkin til at eftirlønargjøldini í FAS verða inngoldin við skattaðum peningi er, at eftir reglunum um FAS skipanina, fær reiðarin endurgoldið 35% av øllum lønarútreiðslum. Tí verður eftirlønin útgoldin yvir skattaskipanina eins og lønir.

## Neutralt

Í fyrstu syftu kann hendan skipanin tykjast sum ein vansi fyri limin, tí hesin ikki fær rætt til tann skattliga fyrimun, ið vanlig eftirlønargjøld geva. Vansin her og nú er tó ikki verri enn so, at limurin, eftir reglunum í FAS skipanini, hevur ein fastan skatt uppá 35%, og harvið eisini ein marginalskatt uppá 35% – ið merkir at hann av síðst goldnu krónu eisini rindar 35% í skatti. Var eftirlønin goldin sum vanligt – uttan um skattaskipanina, og inn á eina kapitaleftirløn, skuldi limurin rinda 35% í avgjaldi av útgjaldinum. Skipanin er sostatt skattliga neutral.

At gjøldini í staðin verða inngoldin av skattaðum peningi, og limurin missir rætt til 35% í frádrátti, vinnur seg aftur í útgjaldinum, við tað at hann ikki skal rinda avgjald av útgjaldinum.

## Neyðugt er við broytingum í lóggávuni

Manningarfeløgini hava sett seg í samband við Vinnumálaráðharran og FAS umsitingina, um at fáa broytt lóggávuna soleiðis, at annaðhvørt skulu reiðaríini fáa refusión av eftirlønarútreiðslum ella, at inngoldin eftirløn kann dragast frá skattskyldugu inntøkuni. Tey signal vit higartil hava fingið eru positiv, tí sjálvandi skal FAS skipanin vera fult kappingarfør við aðrar líknandi skipanir.

## Aðrir vansar

Í okkara samskifti við TAKS er komið fram at eingin frádráttur verður loyvdur í FAS inntøku. Hetta kemst av, at skipanin skal vera útreiðsluneutral fyri landið. Tann skattur sum FAS-arar gjalda skal neyvt samsvara við refusiónina til reiðaríini. Tískil fáa FAS-arar ikki barnafrádrátt og heldur ikki frádrátt fyri egnar penjónsskipanir so sum inngjøld á 60 ára konto.

## Pensjónsreformur

Enn er ógreitt, hvussu FAS skattaskipanin kemur at sampakka við komandi pensjónsreform. Fyribils hava vit fingið tað svar, at neyðugt verður við serreglum fyri FAS inntøku. Manningarfeløgini fara at fylgja hesum málið neyvt, so at limir okkara ikki eru verri fyri enn onnur á arbeiðsmarknaðinum.

## Royna at greiða málið

Manningarfeløgini hava roynt at fáa fakta á borðið í hesum torskilda málið. Fundir hava verið við Lív og TAKS, eisini hevur skrivarin hjá Reiðarafelagnum Fyri Farmaskip verið við.

Fyribils er tann støða tikin, at um onkur limur heldur ynskir at fáa peningin útgoldnan, so fara feløgini ikki at mótmæla. Samráðingar eru ígongd við Lív um tillagingar í eftirlønarsáttmálanum. ■




mid_og_magn_2_2009:mid_og_magn_blatt 6/7/09 16:37 Page 33


# Hiti EURONOM FlexiFuel

**EURONOM FlexiFuel skipanin kann setast til fleiri hitakeldur t.d. hitapumpur, sólfangarar, vindmyllur og ovnar til ymisk brennievni, so sum: træ, pillarar, gass og olju.**

**Skipanin velur altíð ta skilabestu/bíligastu hitakelduna.**

**ExoAir hitapumpan er ein luft til vatn hitapumpa úr rustrfríum stáli.**






**HITI - Stoffalág 33, Tórshavn - telefon: 31 50 08 & 51 50 08**

# HITI: 200 hitapumpur í tvey ár

**Sp/f Hiti læt upp handil í Stoffalág tann 4. mai 2005. Teir ið stovnaðu fyritøkuna mettu, at stórur tørvur var á tænastum innan rør, hita og sanitet. Eigararnir settu sær sum mál at vera slóðbrótandi á hesum øki. Tí hevur fyritøkan valt at ganga undan, tá talan er um umhvørvisvinarliga orku.**

Hetta gjørdi, at teir fóru undir at kanna ymiskar hitapumpuloysnir, og í februar 2006 fóru teir undir at selja luft til vatn hitapumpur, sum vóru púra ókendar í Føroyum tá.

Fyrstu tíðina hildu fólk ikki, at hitapumpan kundi loysa ketil og oljufýr av. Men sparingarnar vóru so mikið eyðsýndar, at fleiri og fleiri valdu hitapumpu í staðin fyri oljufýring.

## Euronom hitapumpur

Sp/f Hiti umboðar Euronom hitapumpur, sum eru framleiddar í Svøríki.

Teir selja vatn til luft og jarð til luft hitapumpppur, men ikki luft til luft.

Miðdepilin í skipanini er ein samlitangi, sum kann bindast í ymiskar orkukeldur so sum hitapumpur, sólfangarar og brenniovnar av ymiskum slag. Skipanin hevur altíð møguleika fyri at nýta bestu hitakelduna, sjálvt tá orkuprísir og politikkur broytist.

Tann mest vanliga hitapumpan hjá teimum er ein luft til vatn hitapumpa úr rustrfríum stáli. Skipanin kann veita hita til radiatorar og gólvheita.

Fyritøkan hevur valt ikki at selja luft til luft hitapumpur, og vísa tískild til aðrar veitarar, tá talan er um hetta slagi av pumpum.

## Hava selt 200 hitapumpur

Sp/f Hiti hevur selt og sett upp umleið 200 hitapumpur kring landið.

Á www.euronom.fo ber til at lesa um sólpanel, brenniovnar og peisir, sum kunnu knýtast til ein og sama tanga.

Royndirnar hjá Sp/f Hiti við hitapumpum eru góðar. Men tað er altíð umráðandi at rokna út nær ein íløga í eina hitapumpu loysir seg peningaliga.

Sp/f Hiti bjóðar kundum sínum eina trygga viðlíkahaldsavtalu til hitapumpur, og hava harumframt døgntænastu á tlf. 51 50 08. Teir hava 8 fólk í starvi.

Heimasíða: www.hiti.fo



*Ólavur Frederiksen hevur hitapumpu og sólfangarar frá HITA, og hevur nú eisini keypt vertikala vindmyllu.*

## Ólavur Frederiksen

Ólavur Frederiksen keypti í 2004 eini eldri hús á Konmansmýru í Havn.

Húsini høvdu vanligar radiatorar, oljufýring og ein rímiliga nýggjan ketil.

Um hetta mundi kvinkaðist oljuprísurin javnt og samt uppeftir og tað frættist, at vit kundu rokna við munandi hægri oljuprísi um ikki so langa tíð.

Tað gjørdi, at Ólavur fór at hugsa um alternativar orkumøguleikar. Hann ynskti eina hitaloysn, sum var meira jøvn í kostnaði. Við støðugt hækkandi oljuprísi vóru hitaútreiðslurnar eisini støðugt vaksandi. Tann trupulleikan vildi hann sleppa sær av við.

Hann fór tí undir at kanna, hvørjir aðrir møguleikar vóru. Hann hevði hug at sleppa sær av við ketil og oljufýring, men varðveita radiatorarnar, sum vóru í húsinum.

## Ongin vitan um hitapumpur

Ólavur hevði frætt, at í okkara grannalondum riggaðu luft til vatn hitapumpur væl, og hugsaði tí, at slíkar pumpur áttu at rigga minst líka væl í Føroyum. Hann setti

sær tí fyri at kanna málið, og vendi sær fyrst til tær stóru VVS fyritøkurnar í Havn. Men har var ongin áhugi, teir søgdu seg vita um hitapumpur, men løgdu afturat, at tað var ómøguligt at fáa tær at virka væl í Føroyum.

## Pípan fekk eitt annað ljóð

Men tá hann so fór inn á gólvið hjá sp/f HITA í Stoffalág var støðan ein heilt onnur, teir greiddu frá, at teir seldu Euronom hitapumpur. Tær verða framleiddar í Svøríki, og teir kundu garantera, at tær eisini riggaðu væl í Føroyum.

Hetta helt Ólavur vera áhugavert, og bað tí um eitt tilboð. Í tilboðnum varð greitt frá, at hann ikki skuldi skifta radiatorar, og at hann kundi seta aðrar orkukeldur til tangan, sum stýrir allari hitaskipanini. Hetta metti hann vera sera áhugavert, og tók tí av tilboðnum. Umframt hitapumpuna bílegði hann eisini 4 sólfangarar frá sp/f HITA.

Henda skipanin hevur virkað so mikið væl, at hann nú eisini hevur bílagt sær eina vindmyllu, sum skal setast til verandi hitaskipan.

## Vil vera leysum av vaksandi oljuprísi

Og Ólavur leggur at enda afturat, at tað, sum liggur fremst í huganum er at vera leysur av olju og oljufýring. Hann ivast ikki í, at ein alsamt vaksandi oljuprísur verður ein tung byrða hjá mongum húsarhaldum í Føroyum, men ikki hjá teimum.

Tey eru 4 vaksin og trý børn í húsinum, sum eru í tveimum hæddum - hvør hæddin er 105 fermetrar.

Tey eru sloppin av við stórar oljurokningar og meta ikki, at elrokningarnar eru vorðnar órímiligar. Tey fylgja væl við elnýtsluni og síggja, hvussu stórur partur av elrokningin er fyri ljós og, hvussu nógv er fyri hita.

Sum dømi kann nevnast, at í 2007 brúktu tey 8.670 kwt. til at hita húsini upp við; tað svarar til 1.083 kr. um mánaðin. Í 2008 brúktu tey 9.272 kwt. til hita, sum er 1.159,- kr. pr. mánað. Og so eiga vit eisini at minna á, at tey eru 7 fólk í húsi.

At enda kunnu vit leggja afturat, at Ólavur Frederiksen er sera dugnaligur fotografur, og hevur áhugaverda heimasíðu: http://www.faroephoto.com




Fá tær tvey ymisk gjaldskort við í taskuna, tá tú fert uttanlands at ferðast

Kort nummar tvey kann tryggja tær, at upplivingin gerst góð. Vilt tú vera vís/ur í altíð at hava pening til taks á ferðini, er tað eitt gott hugskot at hava eitt eyka MasterCard ella Visa Electron kort afturat tínum vanliga gjaldskorti.

Skuldi tað hent seg, at tú misti annað, ella annað kortið av onkrari orsøk ikki riggar, so hevur tú hitt í bakhondini. Í Eik hava vit fleiri sløg av gjaldskortum. Tí kunnu vit altíð finna júst røttu kortini til tín

www.eik.fo

ADVOKAT VIRKIÐ

Páll Nielsen, adv.
Eyðhild Skaalum, adv.
Sigmund Poulsen, adv.
Hans Trygvi Teirin, adv.

J. H. Schrøtersgøta 20
Postboks 85
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 31 21 71
Telefax +298 31 58 74
advokatvirkid@advokatvirkid.fo

# Hitapumpuloysnir frá Demich

**P/F Demich veitur nútímans tænastu á øllum økjum, tá talan er um hita, vatn og ventilatión. Fyritøkan hevur deildir í Havn, í Saltangará og í Vági.**

Hjá Demich starvast um 45 fólk, sum eru knýtt at verkstaði, handlum og skrivstovu.

## Vølund hitapumpur

Demich umboðar og selur hitapumpur av slagnum Vølund og Mitsubishi Electric, og arbeiðir við mongum ymiskum møguleikum at útvega grøna orku. Tað verið seg orku úr luftini, jørðini ella sjónum.

Síðani á heysti 2007 hava Vølund luft/vatn hitapumpur verið nýttar í bæði gomlum og nýggjum húsum í Føroyum. Øll, sum keypa hitapumpu frá Demich, fáa tilboð um eina hitatænastu. Hitatænastan fevnir um eitt árligt eftirlit, har hitapumpan verður kannað. Hitatænastan tryggjar tær at hitaskipanin virkar á bestan hátt, og Demich greiðir møguligar trupulleikar. Tænastan er virkin 365 dagar um árið. Ringjast kann yrkadagar millum kl. 8 og 22 og í vikuskiftinum og halgidagar millum kl. 10 og 22.

## Síggja stórar fyrimunir

Demich fylgir væl við menningini á økinum; í mars 2009 vóru 5 mans frá fyritøkuni á skeiði í hitapumpuskipanum. Hetta skeiði varð hildið í Marknaryd í Svøríki, har Nibe hevur sítt høvuðssæti og síni vælútbygdu undirvísingarhøli.

Sjóorka er eisini ein spennandi møguleiki í Føroyum. Knattstøða Føroya er soleiðis, at tað eigur at liggja væl fyri at fáa orku úr hitanum í sjónum. Demich er eisini við í tílíkum verkætlanum, m.a. í sambandi við nýggja bygningin hjá Articon á Skála.

Atli Nattestad er tann hjá Demich sum hevur arbeitt mest við hitapumpum. Atli lærdi til rør/blikksmið 1992-97. Frá 2003-05 las hann til HVS-installatør í Danmark. Í 2005 yvirtók hann HVS-fyritøkunu, sum pápi hansara, Leivur Nattestad, hevði. Og í 2008 løgdu so sp/f Leivur Nattestad og P/F Demcih virksemið sítt saman.

## Valdu luft til vatn pumpu

Í fjør fluttu Jákup og Birna Haraldsen og døtrarnar Fríða og Lisa inn í nýggju hús teirra í Sørvági.

Jákup og Birna greiða frá, at tá tey fóru undir at byggja ynsktu tey sær eina orkuloysn, sum var orkusparandi og umhvørvisvinarlig.

Tey kannaðu ymsar hitaloysnir og frættu um nýggj hús, sum høvdu hitapumpu í staðin fyri oljufýring. Tey frættu eisini, at hetta var ein loysn, sum riggaði stak væl.

Av tí, at tað eru fleiri sløg av hitapumpum, og fleiri, sum selja hitapumpur kannaðu tey fleiri møguleikar.

At enda valdu tey at keypa eina Vølund luft til vatn hitapumpu frá Demich.

Tað vóru fleiri orsøkir til, at tey valdu hesa loysnina. Tey mettu, at tað hevði stóran týdning, at tey keyptu frá eini fyritøku, sum hevði royndir við luft til vatn hitapumpum, og sum kundi geva teimum eina trygga tænastu, sum altíð var tøk, um okkurt skuldi verið áfatt.

Enn havi eg ikki havt brúk fyri hesi tænastu, men hetta er ein stórur tryggleiki, greiðir Jákup frá.

## Stór íløga, sum roynist væl



*Atli Nattestad*

Íløgan í eina hitapumpu er størri enn íløgan í eina oljufýring. Hitapumpan hjá Jákup og Birnu kostaði umleið 45.000,- kr. meira enn ein íløga í eina vanliga oljufýring við ketli og oljutanga.

Men hitapumpan hevur roynst sera væl. Jákup hevði vónað, at tey fóru at brúka einar 1.000 krónur um mánaðin til hita og vatn. Og hann er ikki vónsvikin. Miðalnýtslan fyri hita og vatn hevur verið umleið 850 kr. um mánaðin, og tað er hann sera væl nøgdur við.

Húsini eru í einari hædd við lofti; tilsamans 180 fermetrar.



*Húsini hjá Jákupi og Birnu í Sørvági.*

# Føroyapumpan væl umtókt

**Clement Christiansen er helst maðurin, sum hevur drúgvastu royndirnar við hitapumpum í Føroyum.**



Í 2oo3 setti hann sær fyri at kanna, hvussu luft til luft hitapumpur roynast í Føroyum. Tá vóru hitapumpur púra ókendar um okkara leiðir. Fyrsta hitapumpan hjá Clement var ein Panasonic pumpa, sum var umbygd til Norðurlendskt veðurlag. Og royndirnar hjá honum vóru góðar; tann fyrsta pumpan hjá honum koyrir framvegis væl, ikki heima hjá honum, men nú í Fuglafirði – 6 ára gomul.

## Selt 500 pumpur í 6 ár

Fyri at fylgja við menningini av hitapumpum keypti Clement sær í 2006 eina nýggja Panasonic pumpu. Hendan var nýggj á marknaðinum, og hevur roynst betur enn tann fyrra.

Gamla pumpan brúkti u.l. 13,- kr. av el um døgnið, meðan tann nýggja brúkar u.l. 6,- kr.

Síðani Clement fór undir at selja hitapumpur hevur hann – í 6 ár – selt umleið 500 pumpur. Her eigur at vera nevnt, at hann nú eisini selur Mitsubishi hitapumpur. Vit selja Mitsubishi Heavy.

## Handverkari og køliteknikari

Sølan av hitapumpum er annars ikki høvuðsyrki hjá Clement. Hann hevur handverksútbúgving og hevur í mong ár arbeitt sum køliteknikari hjá Johnson Controls. Har er dagliga arbeiði hansara uppsetan, eftirlit og umvæling av frystiútgerð á t.d. flakavirkjum kring landið. Eisini arbeiðir hann umborð á skipum. Hann hevur arbeitt í 25 ár sum køliteknikari.

Av tí at hitapumpur arbeiða eftir sama prinsippi sum frystiútgerð, má Clement sigast at vera serfrøðingur á báðum hesum økjum.

## Stórar sparingar

Tað hevur víst seg, at luft til luft hitapumpur hóska serliga væl í stórum rúmum, sum t.d. í kirkjum og samkomuhúsum.

Sum dømi kann vera nevnt, at kirkjan í Lorvík hevur haft hitapumpu í gott og væl tvey ár. Áðrenn hitapumpan var keypt brúktu tey – í fleiri ár – omanfyri 8.000 litrar av olju um árið. Eftir at hitapumpan var sett til fall oljunýtslan. Í 2008 brúktu tey t.d. 2.554 litrar av olju. Hinvegin er elnýtslan nógv økt; í 2006 var elnýtslan 4.844 kwt. meðan hon í 2008 var 14.000 kwt.



mid_og_magn_2_2009:mid_og_magn_blatt 6/7/09 16:37 Page 38


# Vit bjóða hitapumpur

Luft til vatn - Berghita - Jørðhita - Luft til Luft

Stutt sagt eina loysn til ein hvønn tørv...



"Støkk inn á gólvið og fá eitt prát við okkum"

VØLUND VARMETEKNIK

Hiti - Vatn - Sanitet

demich

mid_og_magn_2_2009:mid_og_magn_blatt 6/7/09 16:37 Page 39




# Hitapumpur frá Reno-Vent

**Reno-Vent varð stovnað 10. juli 1996, og endamálið við felagnum var sum navnið sigur, at reinsa og viðlíkahalda ventilatiónsverk. Byrjað varð í smáum at gera HVS uppgávur av ymiskum slagi, og sum frá leið, vaks talið á starvsfólkum frá einum til trý starvsfólk í 2001.**



Í seinnu helvt av 2001 varð byrjað at bjóða uppá størri arbeiðir; tá vaks starvsfólkatalið skjótt; og í 2004 vóru starvsfólkini 13 í tali.

Í sambandi við, at felagið vaks varð nýggjur bygningur við skrivstovu og handil bygdur í Hósvík. Av tí, at felagið ger arbeiði ymsastaðni í landinum, varð avgjørt at byggja í Hósvík.

Í 2008 hevði Reno-Vent fleiri stór arbeiðir og starvsfólkatalið vaks upp í 30.

## Hitapumpur

Reno-Vent umboðar IVT og Hiyasu hitapumpur. Talan er um luft til luft, luft til vatn og hitapumpur til jarðhita.

## Viðlíkahald av hitapumpum

Í sambandi við sølu av hitapumpum bjóðar Reno-Vent kundum sínum viðlíkahaldsavtalu, sum m.a. fevnir um:

- Reinsa ella skifta filtur.
- Reinsa kondisator.
- Kanna avríming.
- Kanna automatik.
- Kanna pumpu.

## Leiðsla og heimasíða:

Stjóri í Reno-Vent er Hans Jakku Hansen.
Heimasíða www.renovent.fo

mid_og_magn_2_2009:mid_og_magn_blatt 6/7/09 16:37 Page 40

